Limablað nr. 10 • 2025

# Eldri

Landsfelag Pensjónista



## FEKK BÍBLIU Í TROLIÐ

## ELDRADAGUR Í SKOPUN

## MÓTROKNING Í PENSJÓNINI

**Blaðið Eldri**

Einaferð um árið gevur Landsfelag Pensjónista út blaðið Eldri. Endamálið við blaðnum er at kunna pensjónistar og onnur um ymiskt, ið áhugavert er hjá eldri, heima sum uttanlanda, at lesa.

**www.eldri.fo**

**Ábyrgd**
Beate L. Samuelsen, forkvinna

**Samskipari**
Gunnleyg Durhuus, skrivari og samskipari

**Umbróting**
Grafikmaster / Kári við Rættará
www.grafikmaster.fo

**Prent**
Prentumsiting: Estra

**Forsíðumynd**
Ingeborg Vinther
Myndatakari: Gunnleyg Durhuus

**Landsfelag Pensjónista**

Landsfelag Pensjónista er felag fyri allar pensjónistar og øll eldri í Føroyum. Limir í Landsfelagnum eru pensjónistafeløg og eldrafeløg í Føroyum. Landsfelagið hevur til endamáls at arbeiða fyri fíggjarligum, sosialum, mentanarligum og øllum øðrum áhugamálum pensjónista.

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1,**
**FO-160 Argir**
**Tel: 21 93 94**
**T-postur: lp@eldri.fo**
**Heimasíða: www.eldri.fo**

# INNIHALDSYVIRLIT

AÐALFUNDUR HJÁ LP 12. APRÍL 2025 ........ 3
LEIÐARI – KENNA OKKUM SUM SYNDABUKKAR ........ 4
ANDAKT VIÐ ANNE METTE GREVE KLEMENSEN, PRESTI ........ 6
SIGLIR SMYRIL, SO ERI JE UMBORÐ ........ 8
VANTANDI PRÍSJAVNING AV ALMENNU PENSJÓNUNUM ........ 10
MÓTROKNING HEVUR NEILIGA ÁVIRKAN Á ARBEIÐSLUTTØKUNA ........ 13
VEGLEIÐANDI ÚTROKNING AV TÍNARI PENSJÓN ........ 16
SOFAPRÁT Á TORGINUM Í SMS ........ 17
ÁRSVEITSLAN 2025 HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA Í DANSIFRØI ........ 21
ELDRADAGURIN 2025 Í SKOPUN ........ 24
RØÐA JÁKUP ANDREASENS Á ELDRADEGNUM ........ 28
FEKK ENSKA BÍBLIU Í TROLIÐ ........ 29
DØGURÐAUPPSKRIFTIR ........ 35
ÁRSFRÁGREIÐING VÁRIÐ 2024-VÁRIÐ 2025 ........ 36
NSK-FUNDUR Í NOREG Í MAI 2025 ........ 42
FRÁ ASTMAHEIMI TIL HEILSUSTOVN ........ 44
NORSKA HEILSUHOTELLIÐ FREDHEIM LIVSSTILSSENTER ........ 47
AVSLÁTTARAVTALUR ........ 54
PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØG Í FØROYUM ........ 58

# LANDSFELAG PENSJÓNISTA HEVÐI AÐALFUND 12. APRÍL 2025



***Frá vinstru: Maria Olsen, Erhard Jacobsen, Beate L. Samuelsen, Alfred Olsen og Jákup Andreasen. Eftir aðalfundin skipaði nevndin í Landsfelag Pensjónista seg soleiðis: Beate L. Samuelsen, forkvinna, Jákup Andreasen, næstformaður, Alfred Olsen, nevndarlimur, Erhard Jacobsen, nevndarlimur, Maria Olsen, nevndarlimur***

Leygardagin 12. apríl 2025 hevði Landsfelag Pensjónista aðalfund á Hotel Hafnia, har nógvir limir møttu. Á skránni var m.a. nevndarval, har tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali og tríggir varalimir.

Forkvinnan Beate L. Samuelsen beyð vælkomin og legði ársfrágreiðingina fram. Gott kjak var á fundinum og síðan var nevndarval á skránni.

Ingeborg Vinther stillaði ikki uppaftur til nevndina, nú hon hevur verið nevndarlimur í 10 ár.

Ingeborg fekk nógvar heilsanir og verður hennara íkast saknað í nevndini.

Í nevndina vóru vald:
Beate L. Samuelsen, Pensionistafelagið í Havn
Alfred Olsen, Pensjónistafelagið á Toftum
Maria Olsen, Pensjónistafelagið Hugni

Sum varalimir vóru vald:
Johild Joensen, Eldrafelagið Nón
Mads Guttesen, Pensionistafelagið í Havn
Hildibjarta Jacobsen, Eldrafelagið á Eiði

# Leiðarin: Kenna okkum sum syndabukkar



## Pensjónistar trælkast til at arbeiða nøkur ár aftrat

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***

Sum pensjónistar fáa vit skotið í skógvarnar, at vánaliga haldføri landsins kemst av okkara áralanga ábyrgdarloysi. Tað er skilaleysa peninganýtslan frá arbeiðslívi okkara, at samfelagið í dag ikki megnar at fíggja ein undirsjóvartunnil til Suðuroyar. Tí skal pensjónsaldurin hækkast til 70 ár.

Man plagar at siga, at jú oftari eini ósannindi verða endurtikin, tess meiri trýr man, at hetta er sannleikin.

Eftirsum vit eru landsins elsti bólkur av borgarum, kunnu vit við góðari samvitsku og við so røttum ryggi, sum til ber sambært heilsustøðu einstaklings og lívsins langa virksemi okkara, mana hesi mannminkandi orð, har piparið grør.

### Tvey samantvinnað uppskot

At tvinna samgonguuppskotið um skundhækkan av pensjónsaldrinum upp í 70 ár í gerðabýti við politiska undirtøku av einum undirsjóvartunli til Suðuroyar fyri einar átta milliardir krónum ella uppaftur meir, er ikki ein leiklutur, pensjónistar eiga minsta petti í. Jánkasliga mugu politikarar av og á – og undir trýsti – viðganga, at teir ikki rættiliga vita, hvussu nógvar milliardir, talan er um.

Orsøkin til tað er m.a., at man ikki hevur nágreiniliga vitan um, hvat slag av tilfarsdygd, man kann vænta at renna seg í á havsins botni, tá farið verður undir arbeiðið við einum Suðuroyartunli. Við høvdinum beint omanfyri vatnskorpuni, kunnu vit vænta okkum eina feita vatntætta rokning stungna beint upp undir nasagluggarnar.

Slík óvissa kemur at kosta okkara landi nógv. Skal man tá halda fram við tunnlaarbeiðinum? Ella skal man steðga arbeiðinum og seta propp í? Hvussu ger man tað? Við eini snar-uppringjan til serkunnleikan yviri í Noreg kanska?

Tað loysir neyvan slíkan trupulleika hjá einum landi, sum ikki eigur fíggjarliga afturpartin í sær sjálvum.

### Ein vælkomin Suðuroyartunnil

Um vit taka uppskotið um landsins haldførisloysn fram aftur um nøkur ár og hækka framtíðar pensjónsaldurin upp í 80 ár, hjálpir tað hvørki til ella frá, tí tá eru øll eldri fyri langt síðani hoyknað undan fleiri ára forlongdu pensjónsarbeiðsbyrðuni og eru endað har, landið kann spara útgjald av pensjónum einaferð "med alla".

Men eitt vita vit, ið umboða pensjónistar, sum eftir politiskari ætlan skulu fíggja eina komandi risastóra undirsjóvarverkætlan. Tað er, at komandi ættarlið við einum tungum loddi um hálsin skulu trælkast til at arbeiða nøkur ár longur og skjótari, enn upprunaliga ætlað sambært Pensjónsnýskipanini, sum kom í gildi í 2020.

Suðuroyartunnilin skal vera so hjartaliga vælkomin. At sigla um Suðuroyarfjørð í ódnarveðri, er ikki gamansleikur. At koyra turt og trygt hesa somu leið til restina av okkara vakra landið, hava øll, sum ferðast á hesi leið, uppiborið.

Men tað skal ikki verða við tí treyt, at hækkanin av pensjónsaldrinum skal flættast uppí verkætlanina. Ei heldur kann tað verða okkara skyld, at kostnaðarmikla verkætlanin ikki verður til nakað í morgin.

Vit eiga absolutt ongan leiklut at verða skýrd syndabukkar í hesi ætlan, so sum nakrir politikkarar saman við Búskaparráðnum um landsins vánaliga haldføri landsins alment ferð eftir ferð skíra okkum at vera.

## Lurtið eftir fólkinum

At skumpa fíggjarligu ábyrgdina av landsins størstu verkætlan yvir á okkara herðar, er ein ógvuliga álvarslig og tung ábreiðsla, sum vit sum pensjónistar ikki vilja hava liggjandi á okkum.

Takið hana á tykkara egnu herðar, meðan tit sita við valdinum.

Núverandi løgmaður segði beint undan, at málini um Suðuroyðartunnilin og hækkanin av pensjónsaldrinum skuldu til 3. viðgerðar í løgtinginum í mai, at vit, altso allir føroyingar, máttu vísa suðuroyingum solidaritet við einum Suðuroyartunli.

Hví ikki eisini vísa øllum landsins pensjónistum solidaritet?

Nøkur sekund undan 3. viðgerð varð uppskotið um hækkan av pensjónsaldrinum tikið aftur. Og Suðuroyaruppskotið? Ja, tað fall í sama triðja politiska løgtingsumfari burtur fyri at verða tikið uppaftur av nýggjum komandi tingsetu í heyst.

Almenna umberingin viðvíkjandi afturtøkuni av uppskotinum um pensjónsaldurin var, at málið krevur nærri viðgerð, áðrenn tað verður lagt fyri løgtingið aftur.

Løgið, at man ikki fyrr enn í síðstu løtu finnur út av tí, aftaná at málið hevur verið til hoyringar í óteljandi fak- og áhugafeløgum og síðani samtykt í løgtinginum undir bæði 1. og 2. viðgerð.

Tað stutta av tí langa: Politikarar mugu lurta eftir fólkinum, og lurta eftir tí, sum rørist millum manna.

## Friðhalgaðir

Danska orðatakið "Vi alene vide" er eitt smittandi smákykt, ið alt ov ofta smoykir seg runt millum floksgøðingar (breyðpolitikarar).

At núverandi landsins hægstu skulu verða noydd at tryggja vælferðarsamfelagið við m.a. at hækka pensjónsaldurin, er sera ivingarsamt, serliga í hesum tíðum, har tað vísir seg, at bæði barnagarðar og skúlar eru ov lítlir og ov fáir til at húsa okkara gullklumpum. Sum nú er, krevst eykaloyvi frá myndugleikunum fyri at taka øll børn inn á stovnar av ymsum slag.

Tað løgna er, at vit fáa trúttað í oyruni, at barnatalið er í minking, men skúlastovurnar eru ov smáar.

At vit mugu hugsa um komandi ættarlið og harvið fáa skil á haldførinum, skal ikki lastast okkum pensjónistum. Lógarsmiðirnir við Tinghúsvegin í Havn eru teir einastu í landinum, ið undantiknir eru sjálvir at fylgja lógini um hækkaðan pensjónsaldur. Teir eru friðhalgaðir. Tað hava teir sjálvir samtykt um seg sjálvar.

Spurningur kann setast við orðið "solidaritet", sum løgmaður m.a. í mai nevndi í sambandi við ein komandi Suðuroyartunnil.



# VENJINGAR Í TAKKSEMI

***Tekstur: Anne Mette Greve Klemensen, Sóknarprestur, Suðurstreymoyar eystara prestagjald***
***Mynd: Evy Toftegaard Nielsen***

Eitt enskt orðatak sigur: *Count your Blessings*! Á føroyskum: Tel tíni vælsignilsir!

Tað er ein góð venjing soleiðis at bera eyga við alt tað góða, sum dettur niður í reiðrið av vælsignilsum gjøgnum árini. Børn – um man er foreldur-, vinir, upplivingar, góð heilsa, hús, arbeiði, ítriv, sólskinsdagar, føðingardagar, høgtíðir.

Tá ein telur síni vælsignilsir, tykist alt hitt minni góða, sum eisini fylgir við í einum mannalívi, at kámast burtur. At telja vælsignilsir er ein venjing í takksemi. Ein kundi hildið, at lukkan er tengd at, hvussu væl ein klárar seg í lívinum, og hvussu børnini megna at fóta sær. Gaman í hevur tað eisini nógv at siga, men tað er ikki sagt, at bara tí at alt er gingið væl, so kemur lukkukenslan at enda á ellisárum til ein sum krúnan á verkinum.

Tað vísir seg, at fólk, sum eru takksom, hava stóra lívsgóðsku. Tað hevur minni at siga, hvat tað er, man er takksamur um – tað kann eins væl verða takksemi um at njóta ein góðan kaffimunn saman við einum vini sum at klára seg væl fysiskt ella fíggjarliga.

Tað er sjálvur førleikin "at kenna takksemi", sum er avgerandi fyri, hvussu góða lívsgóðsku, ein hevur. At siga við seg sjálvan, at "eg eigi at verða takksamur", sum var tað ein plikt, hjálpir lítið. Tað kann enntá hava øvuta effekt. At brigsla sær sjálvum, at man ikki kennir seg nóg takksaman ella lukkuligan, elvir bara til skuldarkenslu og misnøgd. Men at venja seg at bera eyga við tað góða og siga takk innantanna fyri stórt sum smátt kann harafturímóti elva til, at ein ekta, heilhugað kensla av takksemi og lívsgleði birtist.

Sálmaskaldið í Gamla testamenti hevur eina bøn, ið líkist ensku áheitanini "Count your Blessings":

*"Harri, tú okkum skjól hevur verið ætt eftir ætt. Áðrenn fjøllini vórðu til, áðrenn jørð og heimur vórðu fødd, um aldur og allar ævir ert tú, o Guð! Tú menniskjurnar aftur til moldar letur venda, tú býður: "Komið aftur tit menniskjunnar børn!"*

*Tí fyri tær eru túsund ár sum dagurin í gjár, tá hann liðin er, og sum náttarvøka ein. Tú rykkir tey burtur, sum ein svøvnur tey verða, á morgni tey eru sum grasið, ið grør; á morgni tað blómar og grør, á kvøldi tað følnar og doyr.*

*Sjúti ár er æviskeið várt, og um mikil er megin áttati ár. At telja várar dagar tú okkum læri, at vit mega vísdóm í hjartanum fáa!" Sl 90, ør 1-6, 10-12*

At telja sínar dagar snýr seg ikki um at fáa so nógvar dagar sum møguligt, men um at dvølja við teir dagar, man hevur fingið at liva og taka tað til sín, sum teir bera við sær. Tað er ein lívsvenjing í at goyma góðar løtur í hjartanum, senda eina tøkk og merkja, at tað var gott at hava onkran at uppliva tær saman við, bæði teir ljósu og teir gráu dagarnar. At dvølja við tað góða, sum dagurin ber við sær, elvir av sær sjálvum til takksemi, vísdóm og lívsgóðsku. Tað er annars nóg mikið at stúra fyri, og tað kann fylla nógv, sum ein eldist, og sjúka og skavankir banka á dyrnar. Um hetta var Jesus greiður:

*"Stúrið ikki fyri lívi tykkara, hvat tit skulu fáa at eta, og hvat tit skulu fáa at drekka; ei heldur fyri likami tykkara, hvat tit skulu fáa at fara í. Er ikki lívið meiri enn maturin og likamið meiri enn klæðini?"*

Í dag er ófriður í heiminum og vit kunnu lættliga fylgja ræðuleikunum beinleiðis í sjónvarpinum. Jesus kundi saktans siga, at fólk ikki skuldu stúra – ella kundi hann tað? Tað er so spurningurin.

Tá Jesus livdi var sanniliga nóg mikið at stúra fyri. Fólk vórðu dripin, um tey bara traðkaðu eitt vet við síðuna av, og rættartrygd var nærum eingin. Matur var mangulvøra. Tað er ikki av tilvild, at vit hava so nógvar søgur um Jesus sum tað mettandi lívsins breyðið – tí hann talaði til fólk, sum vóru svong. Gerandisdagurin var ótryggur, og tó segði Jesus: Stúrið ikki. Vit kunnu ikki leggja ein dag afturat lívinum við at bera ótta ella stúra fyri øllum. Hyggið at himmalsins fuglum og speglið tykkum! Tað sama við liljunum á markini. Guð føðir og klæðir tey, og tit eru nógv meira verd, so stúrið ikki!

Kristiliga sæð skulu vit tora at vænta okkum okkurt gott av lívinum, tí kærleikin er veruleiki ímillum alt hitt, ið eisini hoyrir lívinum til. Vit skulu tora at trúgva, at tað er møguligt at byrja av nýggjum har, sum tað ikki ordiliga riggaði í gjár. Til dømis, at vinir, sum fóru hvør til sítt, kunnu koma at fylgjast aftur.

Vit skulu vænta tað besta, ikki sum eitt krav, men sum ein vón og órædd liva hvønn dag í áliti á Guðs umsorgan.

*"Men søkið fyrst Guðs ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt"*, leggur Jesus afturat. Har, sum Guðs ríki vellir fram, má stúran fána burtur.

Liljan følnar og doyr og hevur tó gott mót. Menniskjan er í Guðs hondum, eisini tá hon følnar og doyr, og tað er tað trygga lívsgrundarlagið. Okkara relatiónir eru berandi. Guð er ein relatión, sum ber – sum foreldur bera og hava umsorgan fyri børnum sínum.

Yvir fyri heimsins skapara er menniskjan sum eitt lítið barn, ið krevur umsorgan, mat og klæðir frá foreldrunum. Eins og lítla barnið sleppa vit at taka tað heila fyri givið – tí tað er okkum givið. Og gávur elva til tøkk.

Stúrið ikki! Av tí at vit kenna søgurnar um Jesu lív og frelsuverk, vita vit, at hetta ikki bara er ein naiv flýggjan frá veruleikanum, men harafturímót uppbyggilig tala. Hvør kann við at stúra leggja eina alin afturat ævi síni? Hetta kann Jesus siga við myndugleika til okkum, sum lýða á, tí vit vita, at Jesus gjørdi alt annað enn at flýggja, tá á stóð.

Jesus spákaði ikki bara runt við himmalvendum eygum og hugdi at fuglum, men fór beint inn í lívið hjá menniskjum, har tað hevði tað allar ringast og varð verandi. Hann birti ljós og vón har menniskjan hevði alla grund til at stúra. Jesus vísti við síni medferð, at einki menniskja skal bera lívsins byrðar einsamalt, hvørki tá ella nú.

# – SIGLIR SMYRIL, SO ERI JE UMBORÐ

**Ein heilsan til Ingeborg Vinther, sum í mong ár hevur verið nevndarlimur í Landsfelag Pensjónista**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Mynd: Gunnleyg Durhuus***

Tá Landsfelag Pensjónista boðaði frá nevndarfundum og veðurlíkindini ikki vóru av teimum alrabestu á háveturstíð, plagdu vit av og á líka at sláa uppá tráðin til nevndarlimin Ingeborg Vinther fyri at spyrja, um hon  kom til Havnar á fund.

Svarið frá Ingeborg, sum býr í Vági, var altíð tað sama.

"Siglir Smyril, so eri je við umborð."

Tað kom ikki fyri, at fyrrverandi nevndarlimurin í Landsfelag Pensjónista, Ingeborg Vinther, settist aftur vegna veður.

Eftir at hava verið nevndarlimur í Landsfelag Pensjónista í nógv ár, var tað við sorgblídni, at Ingeborg Vinther nakað undan aðalfundi felagsins í apríl 2025 boðaði felagnum frá, at hon ikki stillaði uppaftur.

Sjálv havi eg sitið í nevndini saman við Ingeborg í eini átta ár, og hevur hon verið gull verd við allari tí vitan, hon liggur inni við, tá tað snýr seg um pensjónistar og eldraøkið.

Sum fyrrverandi virkin politikari og ikki bara sum týdningarmikil fakfelagslimur, men eisini sum fakfelagsforkvinna í mong ár, hevur hon verið hent í dagliga virksemi Landsfelagsins.

Sera gott minni hevur hon sum fáur, ja, so gott, at har hevur einki verið at ivast í, tá hon hevur greitt frá lagnuni, sum ymisk mál innan eldraøkið hava fingið á politiska vøllinum bæði sum nevndarlimur í Landsfelag Pensjónista og sum aktivur løgtingspolitikari og ikki minst mongu árini innan fakfelagsarbeiði.

Ingeborg Vinther hevur ongantíð verið bangin fyri at siga sína erligu meining í samfelagsviðurskiftum.

## Í veðri og óveðri

Trúliga hevur Ingeborg Vinther møtt á nevndarfundum í Landsfelag Pensjónista. Tað

***Á aðalfundi Landsfelag Pensjónista 12. apríl 2025 stillaði Ingeborg Vinther ikki uppaftur. Sum takk fyri týdningarmikla arbeiði hennara í mong ár sum nevndarlimur felagsins, fekk hon fleiri blómutyssir og eina gávu frá felagnum, eitt føroyskt glasframleitt tjaldur. Hjúnini Ingeborg og Andru Vinther hava stuðlað hvørjum øðrum í øllum lívsins viðurskiftum.***



hevur kravt, at hon fundardagar noyddist upp um fimmtíðina á morgni í Vági, har hon og maðurin Andru búgva, fyri at røkka Smyril, sum fór av Drelnesi tveir tímar seinni til Havnar týs- ella fríggjadagar. Hetta, fyri at sleppa suðuraftur sama dag í hampiligari tíð beint aftaná døgurða. Tað var fast. Vit løgdu fundirnar eftir siglingarskránni hjá Smyril fyri, at Ingeborg skuldi sleppa heimaftur nakrar tímar seinni.

Tað er ikki komið fyri, at hon hevur avlýst fundarluttøku vegna veður. Einasta orsøk til ikki at koma á fund í Havn hevur verið, at Smyril ikki hevur siglt vegna veður.

## Stuðul á heimafrontinum

Øll hendan stóra orkan, sum Ingeborg hevur lagt í bæði fakfelagsarbeiðið og arbeiðið innan eldraøkið bæði lokalt og ikki minst innan Landsfelag Pensjónista hevði ikki borið til, um henda sterka kvinna ikki hevði havt ein so góðan mann, sum hon hevur. Andru hevur sanniliga um nakar stuðlað konu síni í øllum virksemi hennara, fyri ikki at gloyma tíðina, tá Ingeborg var aktiv innan politikk.

Andru hevur tikið sær av øllum har heima, tá Ingeborg í styttri og longri tíð hevur verið upptikin norðanfyri av øllum teimum krevjandi uppgávunum, sum hava kravt hennara arbeiðsorku 100 prosent. Uttan hansara stuðul hevði neyvan borið til hjá Ingeborg at verið so nógv burtur heimanífrá, sum hon hevur verið. Ingeborg Vinther rundaði tey 80 árini í mai í ár. Landsfelag Pensjónista vil við hesum orðum takka henni fyri tað stóra arbeiði og ídni, hon hevur lagt í virksemi felagsins innan eldraøkið.

Á aðalfundi Landsfelag Pensjónista á Hotel Hafnia 12. apríl í ár var Ingeborg heiðrað við blómutyssum. Eisini fekk hon eina gávu frá felagnum, eitt litfagurt føroyskt framleitt tjaldur úr glasi.

# Pensjónistarnir raktir av ógvusligari minking í keypiorku hóast almenna javningarprosentið

**Vegna ógvusliga prísvøksturin árini 21-24 er keypiorkan hjá t.d. einum pensjónistahjúnum minkað við meira enn kr. 2.000 um mánaðin, hetta hóast almennu prísjavningina (javningarprosentið) í sama tíðarskeiði.**

*Tekstur: Robert Vilhelmsen*

Ógvusligi prísvøksturin í tíðarskeiðnum 2021-2024 hevur rakt pensjónistarnir sera meint. Eini pensjónistahjún hava td. mist munandi keypiorku, íalt kr. 78.106, herav Samhaldsfasti kr. 35.341, vegna ov lítla prísjavning í hesum tíðarskeiðnum.

Fyri árini 2022-2025 er talan um kr. 4.145 í 2022, kr. 22.269 í 2023, kr. 25.081 í 2024 og kr. 26.611 í 2025. (Sí talvu 1 á s. 11.) (Tølini umfata ov lítla prísjavning av grundupphæddini, viðbótini, Samhaldsfasta og skattafrádráttinum, hóast aðrar reguleringar og javningarprosentið smb. galdandi løgtingslóg nr. 64 frá 2018).



*Robert Vilhelmsen er teldufrøðingur og MBA í leiðslu*

Herumframt er eisini ein munandi minking í keypiorkuni vegna vantandi prísjavning av skattastiganum og skattafríu mótrokningsupphæddini.

Hetta er sera ógvusligt og rakar sera meint, serliga hjá pensjónistum, sum ikki hava aðra

| Keypiorkan hjá pensjónistum minkað sera nógv árini 2022-2025<br><br>Dømi: Giftir pensjónistar - føddir innan 1. januar 1953 | | | |
|---|---|---|---|
| Ár | Vegna ov lítla prísjavning kr. pr. mánað | Vegna ov lítla prísjavning kr. pr. ár | Minni keypiorka fyri hjún kr. pr. ár |
| 2022 | 173 | 2.072 | 4.145 |
| 2023 | 928 | 11.135 | 22.269 |
| 2024 | 1.045 | 12.540 | 25.081 |
| 2025 | 1.109 | 13.305 | 26.611 |
| **Íalt fyri árini 2022-2025** | | **39.053** | **78.106** |

***Mynd 1** . Útrokningin er grundað á prísvøksturin í tíðarskeiðnum, íroknað almennu prísjavningina og aðrar reguleringar fyri tíðarskeiðini, smb. Løgtingslóg nr. 64 frá 2018.*

| Javningarprosent og prísvøkstur 2020-2025 | | |
|---|---|---|
| **Tíðarskeið** | **Javningar-prosentið** | **Prísvøkstur í tíðar-skeiðnum** |
| Mai 20 til mai 21 | 2,05 | 3,09 |
| Mai 21 til mai 22 | 1,25 | 7,26 |
| Mai 22 til mai 23 | 3,80 | 4,42 |
| Mai 23 til mai 24 | 3,60 | 2,99 |
| Mai 24 til mai 25 | ikki lýst | 0,67 |

**Mynd 2**. Javningarprosent smb. løgtingslóg nr. 64 frá 2018 og prísvøkstur smb. Hagstovu Føroya. Javningarprosentið er galdandi fyri árið eftir, nevndu tíðarskeið

arbeiðsinntøku, almenna- ella privata pensjónsskipan. Prístalið í mai 2020 var 120,8 og er vaksið til 143,7 pr. mai 2024, ein vøkstur uppá heili 18,9 %. Almenna javningarprosentið, fyri tíðarskeiðið 2021-2024, er innroknað í upphæddirnar omanfyri og er avmarkað til bert 11,1 %. (Sí talvu 2 omanfyri).

## Javningarprosentið fylgir ikki prísvøkstrinum

Í lýsingini av endamálinum við løgtingslógini frá 2018 um javningarprosent til almannaveitingar, galdandi frá 1.1.2022, skrivar Landsstýrið soleiðis: "Fyri at keypiorkan skal verða varðveitt, má ein veiting sostatt í minsta lagi vaksa við brúkaraprístalinum". Júst tað øvuta er hent hesi seinastu 4 árini, og keypiorkan hjá pensjónistunum heldur fram við at minka.

Hetta er ein sera ógvusligur prísvøkstur og missur í keypiorku, sum ikki sæst aftur í reguleringum av almennu veitingunum til pensjónistarnir. Arbeiðstakararnir á arbeiðsmarknaðinum eru harafturímóti fevndir av feløgum, sum umframt onnur viðurskifti, tryggjar teimum eina løn og keypiorku, sum er í samsvari við prísgongdina og lønarstøðið í samfelagnum.

Veitingarnar til pensjónistarnar eru samansettar av 4 pørtum, sum eru grundupphæddin, viðbótin, AMEG/Samhaldsfasti og skattafrádrátturin. Tølini í hesum døminum umfata bert giftar pensjónistar føddir innan 1. jan. 1953, men ov lítla prísjavningin rakar allar pensjónistarnir sera meint. Í hesum útrokningum eru brennistuðul, aðrar pensjóns-, kapital- ella pensjónsinntøkur og skattafría mótrokningin ikki tikin við.

Landsstýrið arbeiðir við eini ætlan um prísjavning av skattastiganum og øðrum almennum veitingum og eigur samstundis at endurskoða javningarprosentið soleiðis, at tað fylgir ítøkiliga prísvøkstrinum og tryggjar keypiorkuna og livistøðið hjá pensjónistunum.

## Samandráttur og áheitan til Landsstýrið

Samanumtikið er keypiorkan hjá einum pen-



sjónistahjúnum minkað við meira enn kr. 2.000 um mánaðin og stendur við í 2026, um ikki ein munandi broyting verður framd í skipanini. Fyri tíðarskeiðið 2022-2025 er talan um íalt kr. 78.106 í mistari keypiorku fyri eini pensjónistahjún umframt vantandi prísjavning av skattastiganum og øðrum almennum veitingum.

Tá ið so pensjónistarnir royna at vinna sær eina eyka inntøku, verða teir revsaðir við mótrokning í pensjónsviðbótini og øðrum veitingum, um inntøkan er størri enn kr. 61.900, hetta hóast arbeiðsmarknaðinum vantar arbeiðsorku í sera stóran mun. Hetta evnið verður viðgjørt meira nágreiniliga í greinini á s.13.

Heitt verður á Landsstýrið um at taka livikorini hjá pensjónistunum í størsta álvara, broyta skipanina og tryggja pensjónistunum virðilig livikor í tráð við høvuðsendamálini í Pensjónsnýskipanini 2020.

***Tórshavn, september 2025***
***Robert Vilhelmsen,***
***Teldufrøðingur og MBA í leiðslu***

*Keldur: Hagstova Føroya, AMEG, Almannaverkið, Almanna- og Mentamálaráðið og egnar útrokningar*

# MÓTROKNING GRUNDAÐ Á ARBEIÐSINNTØKU HEVUR NEILIGA ÁVIRKAN Á ARBEIÐSLUTTØKUNA

*Tekstur: Robert Vilhelmsen*

Pensjónistar, sum velja at halda fram á arbeiðsmarknaðinum, í ávísan mun, verða revsaðir við mótrokning í pensjónini av hesi arbeiðsinntøku. Hetta, hóast arbeiðsmarknaðurin rópar neyðaróp eftir fleiri hondum. Pensjónistar, sum hava heilsu, hug, orku og møguleikar at halda fram aftaná pensjónsaldurin, kunnu gera stóran mun á arbeiðsmarknaðinum, men mótrokningin forðar fyri hesum. Allar pensjónsinntøkur verða framhaldandi mótroknaðar, og yvir tíð verður hetta stórur partur av samlaðu inntøkuni hjá pensjónistum.

Serliga innan vælferðarøkið t.e. heilsu-, eldra- og heimarøkt, er sera stórur tørvur á fleiri hondum, og  tørvurin er tilsvarandi í stórt sæð øllum vinnugreinum, sum í stóran mun mugu nøkta tørvin á arbeiðsmegi, úr útlondum, umvegis "fast-track" skipanina.

## Tørvur á umleið 2.250 starvsfólkum næstu árini

Bæði privati og almenni arbeiðsmarknaðurin rópa neyðaróp eftir starvsfólkum, og ein skjót og góð loysn er at avtaka mótrokning í pensjónum grundað á arbeiðsinntøku, og soleiðis eggja enn fleiri pensjónistum at arbeiða eftir pensjónsaldur.

Sambært kanning hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag verður tørvur á 750 starvsfólkum næstu árini, og Landsbankin hevur víst á, at almenni arbeiðsmarknaðurin metir ein tørv á 1.500 starvsfólkum fram til 2030.

So her er ein sera álvarslig avbjóðing, sum avmarkar búskaparliga vøksturin í samfelagnum. Samlað fevnir metingin um ein tørv á heili 2.250 starvsfólkum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum.

Hvat gera politisku myndugleikarnir við hesa álvarsligu avbjóðing?

## Pensjónistarnir aftra seg við at taka eitt eyka tørn á arbeiðsmarknaðinum

Mótrokningin í pensjónini er ein ítøkilig orsøk til, at nógvir pensjónistar aftra seg við at taka eitt eyka tørn. Ítøkilig gransking í Danmark hevur staðfest, at mótrokning hevur eina neiliga

ávirkan, og tískil hava tey tikið avleiðingina av hesum og hava avtikið mótrokningina við grundarlag í arbeiðsinntøku.

Sambært hagtøl fyri tíðarskeiðið 2018-2024, (sí talvu á s. 15), er arbeiðsfjøldin í 2024 lutfalsliga tann sama sum í 2018, og hetta er ikki í tráð við ætlanina hjá Landsstýrinum við pensjónsnýskipanini í 2020 at eggja fólki til at arbeiða aftaná pensjónsaldur.

## Arbeiðsfjøldin er lutfalsliga minkað ella stendur í stað

Talið av pensjónistum, sum hava eina arbeiðsinntøku, er lutfalslig óbroytt síðan 2018 og er minkað í nøkrum aldursbólkum, (sí talvu á s. 15). Tað eru serliga tey í aldursbólkinum 67-72 ár, sum hava arbeiðsinntøku, og síðan fellur talið munandi. Flestu pensjónistar, sum hava arbeiðsinntøku, búgva í Suðurstreymoy og Eysturoy, og talan er um munandi fleiri menn enn kvinnur, sambært Almannaverkinum. Hagtølini siga tíverri onki um, hvussu stór arbeiðsinntøkan er, men bert, at henda arbeiðsfjøldin hevur eina skattskylduga arbeiðsinntøku.

## Kostnaðurin fyri avtøku av mótrokningini kann fíggjast við øktum inntøkum

Almannaverkið hevur mett beinleiðis bruttokostnaðin fyri avtøku av mótrokningini í pensjónini til 80 mill. kr., men møguligar meir inntøkur, sum avleiðingar av broytingini, eru ikki við í hesi kostnaðarmeting.

Avtøka av mótrokningini vil sannlíkt økja um arbeiðsluttøkuna hjá pensjónistunum, teir, sum



longu eru á arbeiðsmarknaðinum, fara at arbeiða meira, og fleiri pensjónistar fara eisini at halda fram við at arbeiða eftir pensjónsaldur. Samanumtikið fara øktar skatta- og mvg-inntøkur at fíggja allan meirkostnaðin hjá landinum, um mótrokningin verður tikin av, og møguliga verður avlop hjá landskassanum.

## Pensjónsnýskipanin 2020 - eru endamálini rokkin?

Pensjónsnýskipanin 2020 skuldi loysa fleiri av omanfyrinevndu avbjóðingum, men mest sannlíkt er tað øvuta galdandi.

Høvuðsendamálini við pensjónsnýskipanini 2020 vóru:

1. At tryggja øllum eina góða pensjón
2. At eggja fólki til at arbeiða eftir pensjónsaldur
3. At styrkja búskaparliga haldførið (hækka pensjónsaldurin við ½ ári 5. hvørt ár)

Hvat er so støðan aftaná hesi 5 árini?

1. Pensjónsveitingarnar eru hækkaðar eitt sindur seinastu fimm árini, men hækkingin stendur als ikki mát við prísvøksturin, m.a. ovurstóru príshækkingini á serliga matvørum. Tí eru livikorini hjá pensjónistum versnað munandi!
2. Talið av pensjónistum, sum halda fram á arbeiðsmarknaðinum, er lutfalsliga óbroytt síðan 2018, sambært hagtølunum í talvuni niðanfyri.
3. Haldførisavbjóðingin er framvegis tann sama, hóast hækking av pensjónsaldrinum við ½ ári 5. hvørt ár. At vit liva longri og fleiri gerast eldri, er avbjóðingin, sigur Landsstýrið. Heldur er tað so, at størsta demografiska avbjóðingin er, at unga ættarliðið, sum skal taka við og fíggja vælferðarsamfelagið, er í stórum falli. Aldursbólkurin 0-29 ár er minkaður við 10 prosentum og 15-29 ár er minkaður við 15 prosentum síðan 1985, hetta hóast ein samlaðan fólkavøkstur á 20% í sama tíðarskeiðið. Fallandi burðaravlop og fráflyting eru høvuðsorsøkin. Eisini er útbúgvingartíðin munandi longri hjá teimum ungu, og tí eru nógv av hesum ikki fult virkin á arbeiðsmarknaðinum fyrrenn umleið 30 ára aldur.

## Niðurstøða

Neyðugt er, at Landsstýrið tekur livikorini hjá pensjónistunum og tørvin á arbeiðsmarknaðinum í størsta álvara og avtekur mótrokningina í pensjónum, við grundarlag í arbeiðsinntøku, beinanvegin! Umframt økt framleiðsluvirði og aðrar samfelagsbúskaparligar fyrimunir, er sannlíkt, at vøksturin í arbeiðsinntøkuni kann fíggja broytingina við øktum skatta- og mvg-inntøkum og møguliga meira enn tað.

***Tórshavn, oktober 2025***
***Robert Vilhelmsen,***
***teldufrøðingur og MBA í leiðslu***

*Keldur: Hagstova Føroya, AMEG, Almannaverkið, Almannaráðið, LM-049/2023 og egnar útrokningar*

**Fólkatal og Arbeiðsfjøld 67-74 ár**
**Gongdin í tíðarskeiðnum 2018 til 2024**

| | 2018 | | | 2019 | | | 2020 | | | 2021 | | | 2022 | | | 2023 | | | 2024 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Arbeiðs-fjøld | Fólka-tal | Í % | Broyting 2018 - 2024 |
| **67** | 392 | 553 | 71% | 360 | 524 | 69% | 357 | 547 | 65% | 316 | 519 | 61% | 326 | 538 | 61% | 380 | 572 | 66% | 403 | 568 | 71% | 0% |
| **68** | 319 | 550 | 58% | 316 | 543 | 58% | 308 | 519 | 59% | 304 | 545 | 56% | 277 | 514 | 54% | 285 | 526 | 54% | 310 | 559 | 55% | -3% |
| **69** | 271 | 565 | 48% | 282 | 542 | 52% | 267 | 533 | 50% | 276 | 515 | 54% | 272 | 547 | 50% | 248 | 509 | 49% | 240 | 510 | 47% | -1% |
| **70** | 215 | 504 | 43% | 221 | 557 | 40% | 201 | 540 | 37% | 212 | 528 | 40% | 228 | 504 | 45% | 226 | 536 | 42% | 209 | 506 | 41% | -1% |
| **71** | 172 | 484 | 36% | 184 | 495 | 37% | 161 | 551 | 29% | 178 | 530 | 34% | 182 | 524 | 35% | 205 | 495 | 41% | 206 | 525 | 39% | 4% |
| **72** | 140 | 428 | 33% | 135 | 478 | 28% | 148 | 489 | 30% | 150 | 548 | 27% | 158 | 526 | 30% | 173 | 518 | 33% | 176 | 484 | 36% | 4% |
| **73** | 117 | 421 | 28% | 111 | 419 | 26% | 102 | 469 | 22% | 117 | 478 | 24% | 129 | 534 | 24% | 152 | 517 | 29% | 139 | 511 | 27% | -1% |
| **74** | 80 | 417 | 19% | 98 | 411 | 24% | 87 | 415 | 21% | 94 | 456 | 21% | 112 | 469 | 24% | 104 | 525 | 20% | 122 | 506 | 24% | 5% |
| **Í alt** | **1.706** | **3.922** | **43%** | **1.707** | **3.969** | **43%** | **1.631** | **4.063** | **40%** | **1.647** | **4.119** | **40%** | **1.684** | **4.156** | **41%** | **1.773** | **4.198** | **42%** | **1.805** | **4.169** | 43% | 0% |

**Kelda: Hagstova Føroya**



# VEGLEIÐANDI ÚTROKNING AV TÍNARI PENSJÓN VIÐ ELLA UTTAN MÓTROKNING, GRUNDAÐ Á ARBEIÐSINNTØKU

***Tekstur: Robert Vilhelmsen***

Á heimasíðuni hjá Almannaverkinum er ein ítøkilig vegleiðing um fólkapensjónina og møguleiki fyri at útrokna tína pensjón, grundað á tínar ítøkiligu fyritreytir um inntøkuviðurskiftini v.m.

Tað eru 2 ymiskar skipanir, tey, sum eru fødd áðrenn 1. januar1953, og tey, sum, eru fødd 1. januar1953 ella seinni.

Vel Fólkapensjón á heimasíðuni hjá Almannaverkinum www.av.fo/fo/utgjoeld-og-veitingar/folkapensjon, síðan velur tú tín aldursbólk, rokna tína pensjón, svarar spurningunum og tú fært eina nágreiniliga útrokning av tínari pensjónin.

Um tú vilt rokna út tína pensjón við ella uttan mótrokning grundað á arbeiðsinntøku, skalt tú gera tvær útrokningar, eina har tú íroknar tína arbeiðsinntøku og eina uttan tína arbeiðsinntøku (fylg vegleiðingini um, hvørjar inntøkur skulu takast við).

Á henda hátt kanst tú fáa eina vegleiðandi útrokning av tínari pensjón, uttan mótrokning grundað á arbeiðsinntøku. Vegleiðandi, tí vit í fyrsta umfari ikki vita, hvussu skipanin verður broytt, ella um hon verður broytt.

| **Tín fólkapensjón um mánaðin** | **9.943 kr.** |
|---|---|
| Grundupphædd - støk | 4.632 kr. |
| Viðbót - støk | 5.311 kr. |
| Fólkapensjón tilsamans | 9.943 kr. |

**Gevið gætur: Eisini fært tú "Samhaldsfasta", sum er ein skattskyldug upphædd á 6.455 kr.**
Les meira um samhaldsfasta á heimasíðuni hjá Taks



*F.v. Beate L. Samuelsen, Markus Hvannastein, Frida Dam og Anna Rúna Jakobsen*

# Sofaprát á Torginum í SMS

**Áhugavert vár-tiltak fór fram á Torginum**

*Tekstur: Beate L. Samuelsen*
*Myndir: Gunnleyg Durhuus*

Fyri aðru ferð var í vár latið upp í hendurnar á Landsfelag Pensjónista at standa fyri einum eldratiltaki á Torginum í SMS.

Fyrstu ferð var 2. mai í fjør. Løtan eydnaðist ógvuliga væl tá.

Tað gjørdi hon eisini í ár, tá vit hin 1. mai sum tey fyrstu í skránni hjá SMS fingu heiðurin at seta Várdagin við einum sofapráti við trimum gestum.

Her kann líka nevnast, at í kalendaranum stendur, at dagurin 1. mai eitur Valborgar-messa. Dagurin eitur eftir tí heilagu bretsku nunnuni Valborg, sum livdi tíðarskeiðið 710 eftir Krist til 25. februar 779.




***Nógv fólk møttu til tiltakið á Torginum í SMS***

SMS hevði gjørt nógv burturúr degnum við eini skrá, sum bæði fevndi um sang við Robert McBirnie, SMS Vox-vinnaranum Jóhonnu, Bubu, konsert við Eyðuni, Terja og Kim umframt DiskoBingo fyri vaksin.

## Áhugaverdir gestir

Tey trý, sum vit høvdu fingið sum gestir hjá Landsfelag Pensjónista, vóru Markus Hvannastein, formaður í Tannlæknafelagnum, sum tosaði um týdningin av tannheilsuni hjá eldri fólki, Frida Dam, harðskapsráðgevi, og Anna Rúna Jakobsen, lærarinna, ið fortaldi um mammu sína, sum fekk so ómetaliga nógv handaligt arbeiði frá hondini.

Viðurskiftini í einum húsarhaldi fyri nógvum árum síðani kunnu ikki metast við tey, vit hava í dag, tá tað kemur til vanligar hentleikar, ið vit



***SMS bjóðaði lagkøku, kaffi og te***

halda okkum ikki kunnu vera fyri uttan. Tá var einki vatn innlagt í húsini, einki el, hvørki vaskimaskinur, el-komfýrur, køliskáp, frystiboksir, sjónvarp ella telefon.

## Dúgliga varð spurt

Í eina góðan tíma stýrdi forkvinna í Landsfelag Pensjónista prátinum, sum fitt av fólki vóru komin á Torgið at lurta eftir.

Fyri at gera tiltakið so hugnaligt sum yvir høvur gjørligt, hevði Marknaðardeildin hjá SMS sett smá borð og stólar upp, har fitt av fólki vóru komin saman og ikki bara lurta, men eisini seta fram spurningar. Tað stóð ikki á at koma fram við spurningum. Fólk hildu seg ikki aftur, tá møguleiki var at seta fram spurningar.

Haraftrat var høvi hjá fólki at fáa ókeypis drekkamunn við lekrum bakstri afturvið.

Ein hugnalig løta hjá pensjónistum at byrja ein Várdag við, og tað gjørdist uppaftur hugnaligari, tá Robert McBirnie endaði okkara tiltak við sangi og tónleiki sínum.

Í fjør vóru gestirnir Alfred Olsen, formaður í Eldrafelagnum á Toftum, Ingeborg Vinther, forkvinna í Eldrafelagnum í Suðuroyar Sunnaru helvt, og Eirik Suni Danielsen frá Tilhaldinum í Havn.




*Tað var hugnaligt at hoyra Robert McBirnie syngja og spæla*



*Ein góður  borðstjóri er týdningarmikil, her er tað Alfred Olsen*



*Áshild Kristiansen, forkvinna í Eldrafelagnum Borgin*



*Jákup Mørkøre var gestarøðari*



*Gott prát millum  menn*



*Kokkurin Rubin Busk og hansara hjálparfólk syrgdu fyri góðum mati og servering*

# ÁRSVEITSLAN 2025 HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA Í DANSIFRØI

**Leygarkvøldið 29. mars var Dansifrøi í Tórshavn aftur karmur um eina av ársins mest vælumtóktu veitslum hjá Landsfelag Pensjónista. Hetta kvøldið hittust limir úr pensjónista- og eldrafeløgunum kring landið til eina hugnaliga og fjølbroytta veitslu við mati, sangi, røðum og dansi.**



*Niels Olsen, harmonikuspælari*



*Gott kvinnuprát*



*Hugni undir borðhaldinum*

*Tekstur: Gunnleyg Durhuus*
*Myndir: Tindra v. Rani Joensen*

### Góð byrjan

Longu frá klokkan 16.30 var høvið at fáa sær ein vælkomudrykk, keypa lutaseðlar við spennandi vinningum og gera seg til reiðar til eitt hugnaligt kvøld saman.

Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelagnum, bjóðaði vælkomin og Alfred Olsen tók síðan við sum borðstjóri.

### Góður stemningur

Kvøldið varð merkt av felagssangi, góðum mati og røðum. Kokkurin, Ruben Busk, greiddi frá matarskránni, og er tað altíð spennandi og vælsmakkadi matur, hann borðreiðir við.

Gestarøðarin hesaferð var Jákup Mørkøre, ið dugir sera væl at gera røðuna áhugaverda og skemtiliga. Tá møguleiki var at fáa orðið undir "Orðið frítt", vóru tað fleiri, ið tóku orðið.

## Tónleikur og dansur

Tónleikurin og stuttliga løtan undir borðhaldinum varð tryggjað av Ólavi Højgaard, Holgari Jacobsen og Niels Olsen, sum eisini spældu til dansin seinni um kvøldið. Tá borðhaldið var liðugt, dámdi fólkið væl at dansa føroyskan dans frá borðinum – og seinni var eisini høvi at royna seg í enskum dansi, meðan kaffi, te og smákøkur vóru borin fram.

## Góðir vinningar

Eitt av hæddarpunktum hetta kvøldið var, tá lutaseðlarnir vóru drignir við nógvum góðum vinningum. Høvuðsvinningurin var ein ferð við Sólorku til Albir í Spania, virði 17.000 kr., umframt gávubræv frá Smyril Line, Atlantic Airways og nógvir aðrir vinningar, ið pensjónista- og eldrafeløgini runt landið lótu.

Ársveitslan í Dansifrøi er kend fyri, at fólk eru í góðum lag, hugnaliga samveru og siðbundnan dans – ein hátíðardagur, har minniligar løtur eru millum vinir. Eitt hugnaligt og minnisríkt kvøld.



*Góður føroyskur dansur*



*Lagið var gott undir borðhaldinum*



*Tónleikararnir Ólavur Højgaard, Holgar Jacobsen og Niels Olsen*



*Sølan av lutaseðlum gekk væl*



*Spenningurin er stórur, tá lutaseðlarnir verða drignir*




*Vinnarin av gávubrævi frá Smyril Line*




*Tann stóri vinningurin frá Sólorku fór til Símun Fornagarð*




*Martha Olsen var tann hepna at fáa vinningin frá Atlantic*



*Dansurin gekk væl*

# ELDRADAGURIN 2025 Í SKOPUN – EIN DAGUR VIÐ LÍVSGLEÐI OG SAMVERU

**Høvuðsvinningurin kr. 45.000 frá Jóan Petur Vang fór til Fuglafirðar**



*Hansina Abrahamsen úr Fuglafirði var hepni vinnarin av ferðini við Sólorku*



*Næstformaðurin í Landsfelag Pensjónista, Jákup Andreasen, segði nógv áhugvert um støðuna hjá pensjónistum í dag*

*Tekstur: Gunnleyg Durhuus*
*Myndir: Petur Poulsen*

Leygardagin 20. september savnaðust pensjónistar úr øllum landinum í Samljóð í Skopun til ársins stóra Eldradag, sum Pensjónistafelagið Kvøldarsól, Sunda Pensjónistafelag og Landsfelag Pensjónista skipaðu fyri. Dagurin bar brá av felagsskapi, góðum mati, undirhaldi – og sjálvandi lutaseðlasølu við stórum vinningum.

Longu frá kl. 12.00 var lív í salinum, tá gestirnir komu, keyptu lutaseðlar og hittu vinir og kenningar. Serliga nógv varð tosað um høvuðsvinningin – eitt gávukort á 45.000 krónur frá Jóan Petur Vang Spf til ferð við Sólorku.

## Stuttligt borðhald

Anna Bjørg Leo, forkvinna í Kvøldarsól, beyð vælkomin, og síðan varð borðreitt við døgurða. Borðstjórin, Bjartur Skipanes, stýrdi bæði borðhaldinum og spældi til felagssangirnar saman við Eyðfinni Guðjónssyni og Ísaki Jacobsen. Dagurin helt fram við røðum frá borgarstjóranum í Skopun, Marjun S. Debes, og varaborgarstjóranum í Sunda kommunu, Jóhonnu Poulu við Streym. Felagssangur og skemt frá Hera Jacobsen setti lív í, og Gerhard Lognberg, fyrrverandi borgarstjóri í Skopun, helt eina áhugaverda framløgu um Skopunar søgu.

Seinnapartin vóru lutaseðlarnir drignir, meðan gestirnir hugnaðu sær við kaffi, te og køkum. Tann stóri spenningurin var, tá drigið varð um



*Anna Bjørg Leo, forkv. i Pensjónistafelagnum Kvøldarsól, bjóðar vælkomin*



*Gerhard Lognberg, fyrrverandi borgarstjóri i Skopun, var ein av røðarunum*



*Bjartur Skipanes, borðstjóri, spældi til sangirnar saman við Eyðfinni Guðjónsson og Ísaki Jacobsen*



*300 fólk vóru til Eldradagin*



*Vitjan i Spinnarínum í Skopun*



*Vitjað varð í Skopunar kirkju*

gávukortið á 45.000 kr., ið Hansina Abrahamsen úr Fuglafirði, var so heppin at vinna.

## Smyrjibreyð og lagkøkur

Hjúnini Krista og Sámal Hanni Lognberg sungu nøkur vøkur løg, og síðani var møguleiki at fara ein túr at vitja Skopunar Kirkju, Spinnaríið og Cakao-tógvhandlin.

Tá fólk komu aftur, varð borðreitt við smyrjibreyði og lagkøkum. Kvøldið helt fram við tónleiki frá Njál og Kristinbjørg, felagssangi og røðum.

Áðrenn dagurin endaði, bar Jákup Andreasen, næstformaður í Landsfelag Pensjónista, eina heilsan fram. Síðani takkaði Vibeke Ingvarsson, forkvinna í Sunda Pensjónistafelag, fyri ein ómetaliga væleydnaðan dag, ið var merktur av lívsgleði, felagsskapi og vælvild.

Til síðst varð farið "upp á gólv", har Jónleif Johannesen skipaði.



***Gott lag undir borðhaldinum***



***Heri Jacobsen fekk fólk at flenna við sínum skemtisøgum***

## Stuðlar og vinningar

Eldradagurin fekk góðan stuðul. Peningastuðul kom frá m.a. Skopunar, Sunda, Skálavíkar, Sands og Húsavíkar kommunum. Eisini frá Føroya Banka, JFK-trol og Føroya Bjór fekk Eldradagurin góðan stuðul.

Lutaseðlavinningar komu frá stórum og smáum stuðlum –Jóan Petur Vang Spf, Smyril Line, Føroya Tele, Á-handlar, Grótvirkið í Skopun og Virgar Hentze. Jacob Fuglø, Turið Olsen og Einar Joensen góvu málningar. Fleiri einstaklingar góvu sítt íkast, m.a. kjøt í heyst.

Eldradagurin 2025 gjørdist ein góður dagur við lívsgleði og samveru. Gestirnir fóru heim við einum smíli – góðum minnum, sum fara at standa klár í langa tíð.

Vit gleða okkum til næsta ár, tann 5. september, tá Eldrafelagið Hugni saman við Landsfelag Pensjónista fer at skipa fyri Eldradegum í Varpinum í Klaksvík.



*Góður sangur undir borðhaldinum*



*Kristinbjørg og Njál sungu sera væl*



*Jóhanna Poula við Streym, varaborgarstjóri í Sunda kommunu*



*Marjun Debes, borgarstjóri í Skopun bar fram heilsan*



*Vibeke Ingvarsson, forkv. í Sunda Pensjónistafelag, takkaði fyri dagin*



*Dagurin endaði við føroyskum dansi*



# RØÐA HILDIN Á ELDRADEGNUM Í SKOPUN 20. SEPTEMBER 2025

***Tekstur: Jákup Andreasen***

Góðu pensjónistar

Tað hevur verið siðvenja, at forkvinnan kemur við eini heilsan frá felagnum, tá Eldradagurin líður móti endanum. Beata er í brúdleypi í kvøld, og tí havi eg fingið hesa uppgávuna.

Eg varð valdur í nevndina fyri Landsfelag Pensjónista nakað eftir, at koronatíðin var av. Tá roknaðu tey flestu við, at nú fór at ganga móti betri tíðum, men tíverri hevur henda vónin ikki hildið stikk.

Tey, sum arbeiða, hava fingið ein stóran lønarvøkstur síðstu árini, meðan príshækkingarnar hava verið uppaftur størri. Í umrøðuni av ólavsøkurøðuni hjá løgmanni varð nevnt, at síðan 2021 eru prísirnir í meðal hækkaðir við góðum 22 prosentum.

Í hesum sama tíðarskeiðnum hevur almenna fólkapensjónin og útgjaldið úr Samhaldsfasta ikki fylgt við prístalinum og als ikki við prísvøkstrinum. Tí gerast tað alsamt fleiri sperdir pensjónistar, nú allir prísir eru farnir á flog. Tíverri sær henda gongdin út til at halda fram.

Vit fimm, sum manna nevndina í LP, liggja tó ikki á tí latu síðuni, men hava javnan fundir við løgtingsnevndir og onnur, sum hava við livikorini hjá okkum pensjónistum at gera.

Tíverri mugu vit staðfesta, at tað gongst illa at halda tørn. Heldur vísir tað seg í politiska kjakinum, at tað eru vit pensjónistar, sum hava skyldina av, at "hol er í landskassanum", og tí er neyðugt at hækka pensjónsaldurin. Hesum hava vit mótmælt staðiliga.

Men alt er ikki bara pengar, og vit arbeiða eisini við nógvum øðrum málum, sum hava við viðurskiftini hjá pensjónistum at gera. Vit senda javnan út tíðindaskriv, har vit gera vart við okkara sjónarmið.

Fyrireikingarnar til henda Eldradagin, sum fer at líða móti endanum, byrjaðu longu síðsta vár. Tá játtaðu Eldrafelagið í Sunda kommunu og Eldrafelagið Kvøldarsól her í Skopun, at tey vildu átaka sær at fyrireika dagin saman við Landsfelagnum, og tað fari eg at siga teimum stóra tøkk fyri. Áhugin fyri degnum hevur verið so stórur, at alt var útselt, langt áðrenn tilmeldingarfreistin var farin. Vónandi fara tit nøgd higani í kvøld.

Eg fari eisini at takka teimum, sum hava stuðlað degnum peningaliga, so prísurin fyri at luttaka ikki bleiv alt ov høgur.

Eg haldi, at talið av lutaseðlavinningum hesuferð hevur sett met. Tí fari eg takka teimum mongu, sum hava stuðlað við vinningum. Kokkarnir, og tey, sum hava serverað fyri okkum, skulu eisini hava eina stóra tøkk.

Tað eru nógvir træðrir, sum skulu samskipast í fyrireikingunum til ein slíkan dag, og tað hava Beate, forkvinna í Landsfelagnum, og Gunnleyg Durhuus, skrivari hjá felagnum, lagt nógva orku í. Tað skulu tær hava stóra tøkk fyri.

Landsfelagið skipar árliga fyri tveimum stórum tiltøkum fyri pensjónistum. Ársveitslan er um várið og Eldradagurin um heystið. Eg kann longu nú siga frá, at ársveitslan verður í Dansifrøi í Havn tann 21. mars komandi ár, og Eldradagurin komandi ár verður í Varpinum í Klaksvík leygardagin 5. september.

Takk fyri, at tit komu og takk fyri meg!

# Fekk enska bíbliu í trolið

**Fyri meiri enn 30 árum síðani endaði ein heilt serligur lutur á dekkinum á Ljósafelli, sum royndi á Hatton Bank. Skipari var Sonny Johannesen**

***Tekstur og myndir: Beate L. Samuelsen***

Eins og nógvir aðrir dreingir fór Sonny Johannesen fyrstu ferð til skips, einans 14 ára gamal. Tað var ikki við pápanum, tí tiltikna raska skiparanum Andrias Johannesen, ein av teim navnframu Hvannasundsbrøðurunum, tí pápin var nevniliga heima henda túrin.

Hóast ringur av sjóverki, vildi drongurin verða sjómaður. Seinni fór hann á Sjómansskúla, og aftaná varð tað sjómanslívið, sum bleiv hansara lívsleið.

Í 1990 var Sonny í Grønlandi í eini tvey ár. Hann sigldi tá sum skipari við grønlendska skipinum Antut, gamla Ennibergi, og sum uppaftur seinni broytti navn til Ljósafelli.



*76 ára gamli rokskiparin, Sonny Johannesen*

Antut plagdi at fiska í Vesturgrønlandi, men knappliga hvarv fiskurin. So varð farið stuttan túr til Eysturgrønlands. Har er næstan altíð illveður og harvið vánalig fiskilíkindi.

Reiðaríið gjørdi tí av at taka skipið heim til Føroyar, tí her var ein kvota, sum Gullak Madsen hevði fingið. Tað vísti seg bara at vera á pappírinum. Hon var ikki til.

Antut hevði fingið nýtt navn, Ljósafelli, men skipið lá bara, tí tað hevði einki fiskiloyvi. Sonny fekk boð frá reiðarínum, at hann kundi gera akkurát, sum hann vildi við Ljósafelli.



***Hjúnini Sonny og konan Kaja eru í dag pensjónistar. Tey búgva í einum hugnaligum húsum við Svalbardsvegin í Havn***

Hesi boðini lat Sonny ikki fara fram við borðinum soleiðis uttan víðari.

## Hatton Bank ókendur

Sonny Johannesen gjørdi av sínum eintingum av at fara út á Hatton Bank at royna. Hann hevði hoyrt um okkurt føroyskt skip, sum hevði roynt har, so hann setti sær fyri at gera tað sama.

Um hetta mundi í 1992 var Hatton Bank annars næstan púra ókent fiskimið hjá føroyingum. Nógv stóð uppá spæl hjá Sonny og manning hansara umborð á Ljósafelli.

"Um royndin á Hatton Bank miseydnaðist, so var tað slutt hjá okkum", sigur 76 gamli skiparin Sonny Johannesen, sum í dag er pensjóneraður og lagstur uppá land.

20. ella 22. juli í 1992 fór Ljósafelli av Havnini og setti kós móti Hatton Bank.

Á Hatton Bank rendi Ljósafelli seg í nógvan fisk.

"Tað sjáldsama var, at stórur partur av fongi-num vóru løgin fiskasløg, sum vit ongantíð høvdu sæð ella hoyrt um áður. Um føroyingar

høvdu komu inn her heima við slíkari last, høvdu vit ikki fingið eitt klovið oyra fyri fiskin, ókendur, so misháttur og ljótur var hann í útsjónd.", sigur Sonny.

Ein franskur sølumaður var um hetta mundið í Føroyum. Tað var hann, sum legði lunnar undir, at Ljósafelli kundi fara til Frankaríki við lastini og selja løgnu fiskasløgini á fiskamarknaðinum har.

Tað gjørdu teir so. Og teir gjørdu kvetti, tá tað kom til prísin.

Einki frættist tó meiri um franskmannin, sum var í Føroyum. Tað vísti seg, at hann var farin til Íslands.

## Stinglaksur populerur

Upprunaliga høvdu teir umborð á Ljósafelli ikki tær stóru vónirnar um at fáa nakran serligan prís fyri løgnu fiskasløgini.

"Men har tóku vit stórliga feil. Prísurin var í topp", sigur Sonny.

Og so gekk leiðin aftur út á Hatton Bank.
Úr Frankaríki komu snarboð til Ljósafelli um at taka øll tey løgnu fiskasløgini, teir kundu fáa fatur á, og koma so skjótt sum yvirhøvur gjørligt aftur til Bologne við fonginum.

Tað vísti seg, at franski eftirspurningurin eftir løgnu fiskasløgunum var stórur. Serliga høvdu franskmenn áhuga fyri stinglaksi. Hann var nummar eitt.

Ikki var lætt hjá skiparanum at gera av, nær siglast skuldi til Frankaríki, tá teir lógu í rokfiskiskapi á Hatton Bank og fylti skipið, tí nógvur fiskur var at fáa.

"Hjá mær var tað eins og hjá øllum øðrum skiparum ein dreymur, sum gongur út, tá man rennir seg í nógvan fisk. Tað snýr seg um at fylla skipið for upp til lúnningina, áðrenn kósin verður sett móti landi", sigur Sonny.

Í hesum førinum mátti hann hugsa seg væl um, so fiskurin kundi verða so feskur sum møguligt, tá hann kom á sølumarknaðin sunnanfyri fyri at fáa mesta prísin fyri hann.

## Alt varð selt

Tað tók Ljósafelli eina viku at sigla av Hatton Bank til Bologne, og stinglaksur var fiskurin, man fekk besta prísin fyri. Ikki tí, góður prísur fekst eisini fyri hini løgnu fiskasløgini, men ikki so nógv sum fyri stinglaksin.

Hvønn dag skuldi Sonny sum skipari rapportera til franska keyparan í Bologne, hvussu nógv, teir høvdu fingið.

Alt varð alt selt. Ikki ein stertur lá eftir, tá teir høvdu landað fiskin.

Seinni funnu fronsku fiskakeypararnir eitt pláss í Skotlandi, sum eitur Air, har Ljósafelli kundi landa fiskin fast. Við at fara inn til Air við lastini og útaftur á Hatton Banka var heldur ikki so langt sum at sigla suður til Bologne at selja og allan vegin aftur á fiskimiðið á Hatton Bank.

Vanliga fiskaðu teir í 5-6 dagar á Hatton Bank, áðrenn teir settu kós móti Air, har veiðan var landað og síðani flutt víðari við bili undir ensku kanalina til Frankaríki.

"Tað var ringt hjá mær sum skipara eftir fáum døgum, tá nógvur fiskur var, knappliga at kvetta túrin av fyri at fáa mest fyri løgnu fiskasløgini.

Eg vildi jú tað sama, sum allir skiparar vilja, nevniliga hava so nógv í lastina sum yvirhøvur gjørligt, tá nógv var at fáa, áðrenn siglt var inn við fonginum", sigur Sonny Johannesen smílandi.

## Hvassar tenn

Stinglaksurin, sum hevði hægsta søluprís, var ikki til at hava við at gera. Hann er ein vandamikil rovfiskur og hevur ómetaliga hvassar tenn. Tær eru spískar sum hvassastu knívar, fara beint inn á bein og læsa seg fastar, um teir fáa fatur á onkrum, líka mikið hvat talan er um. Sonny greiðir frá, at manningin kvetti høvdið av stinglaksinum, tá hann var fingin umborð, og síðani var hann ísaður.

Í tí eina førinum streyfaði ein stinglaksur, sum lá í rúgvuni á dekkinum, annan fótin á einum av manningini, sum var í ferð við at kappa høvdið av einum fiski.

Stinglaksurin, sum lá á dekkinum, streyfaði í hesum førinum líka hælin á øðrum gummistivlanum, sum maðurin var í, og beit seg gjøgnum bæði tjúkka hælin á gummistivlanum, umframt gjøgnum sjálvan stivlan, tjúkku stivlahosuna, kjøtið og for inn á bein á manninum. Tað snúði seg um sekundir. So skjótt gekk tað fyri seg.

## Bláa bíblian

Sum skipari plagdi Sonny Johannesen altíð at fara av brúnni og niður á dekkið at hyggja nærri, hvat var í trolinum, tá hálað var.

Tað gjørdi hann eisini, tá hann førdi Ljósafelli.

Tá alt rokilsið plagdi at vera av uppi á brúnni, og avloysarin hevði tikið yvir eina løtu, fór hann út á dekkið at hyggja, hvat var í.

So var tað ein dagin, teir høvdu hálað á Hatton Bank, at hann, sum hann var vanur, fór at hyggja, hvat hesuferð var í.

Mitt í rúgvuni fær hann eyga á okkurt, sum hann ongantíð fyrr hevði sæð. Tað minti um ein svartan plastikkposa. Hann fór yvir at kanna nærri, hvat hetta mundi vera.

Jú, ein svartur plastikkposi. Hann tók posan og hálvdi innihaldið úr honum. Har komu ymsir lutir skramblandi úr, m.a. ein bók. Tað var ein ensk bíblia, The Holy Bible. Bíblian var tjúkk, ógvuliga tjúkk, og perman var blá. At bíblian var so tjúkk, komst av, at hon bæði fevndi um Gamla Testamenti og Nýggja Testamenti.

## Ein bláfryst bíblia

"Eg tók alt fyri eitt bíbliuna upp úr fiskarúgvuni og setti meg í samband við reiðaríið, har eg fekk fatur á Niels Dan West, sum tá starvaðist har. Eg vildi vita, hvussu eg skuldi bera meg at

*Framhald á s. 34*

# Stinglaksur



## Trolveiddur fiskur hevur oftast mist tað mesta av skræðuni

Um stinglaksin skrivar Havstovan á heimasíðu síni, at hann er langur og mjáur fiskur og væl hægri, enn hann er breiður. Hann hevur eina ryggfjøður, har fremri parturin hevur harðar teinar og aftari bleytar. Eitt týðiligt skarð er millum harða og bleyta partin.

Fremst á gotfjøðurini er ein vælvaksin, aftur-ábendur píkur. Gotfjøðurin er styttri enn aftari parturin av ryggfjøðurini og byrjar aftari. Serliga klænur er hann um klingruna. Hann hevur lítlan, sýldan stert. Hann hevur ikki búkfjaðrar. Høvdið er langt, lágt, smalt og spískt. Kjafturin er stórur við stórum, spískum og ógvuliga hvøssum tonnum. Hann hevur stór eygu og onga roðslu.

Undir Føroyum er hann við bankarnar vestan-fyri, onkur hendinga er fingin eystanfyri, er annars báðumegin í Atlantshavinum og suður til umleið 30°N. Hann er eisini mitt úti í Atlantshavinum við bankar og ryggir.

### Longri enn ein metur

Stinglaksur verður upp í 110 cm til longdar, møguliga enn longri.

Stinglaksur heldir til úr 200 m niður á 1600 m ella djúpari. Hann er bæði botnfiskur og uppsjóvarfiskur. Um náttina er hann uppi í sjónum.

Óskalaður er hann svartur og skyggir sum kopar. Trolveiddur fiskur hevur oftast mist tað mesta av skræðuni, og tá sæst inn á tann hvíta fiskin. Kropsskapið er líkt svørðsblaði. Tenninar. Pík við gotið. Lítli sterturin. Skarðið í ryggfjøðurini yvir gotinum.

Nakað verður veitt av honum undir Føroyum. Annars verður hann veiddur í Spania, Portugal og Madeira.

*Kelda: Havstovan*

fyri at varðveita bíbliuna á besta hátt, nú hon var komin uppá turt", sigur Sonny.

Niels Dan West kannaði málið, og boðini vóru, at bíblian skuldi leggjast í vatn. Hon mátti ikki undir nøkrum umstøðum torna, men skuldi varðveitast í vatni og gjøgnum frystast, um so var, at hon seinni skuldi setast í stand, restaurerast.

Sonny gjørdi, sum sagt varð. Sjask váta enska bíblian var løgd í eina frystiboks umborð.

"Eg tók ta bláu frystu bíbliuna við mær í land, tá Ljósafelli kom heim ta ferðina. Tað fyrsta, eg gjørdi, tá eg kom til hús, var at leggja hana í eina frystiboks", sigur Sonny.

## Horvin

Ætlanin hjá Sonny Johannesen var at fáa ensku bíbliuna restaureraða. Tað er ikki bara sum at siga tað. Eingin her í landinum er serfrøðingur í slíkum arbeiði.

Um bíblian skuldi restaurerast, var hann noyddur at fara til Danmarkar við henni. Hetta hevði kostað ikki heilt einki, tá samanum kom. Tann ætlanin varð tí slept.

Men so hendir tað, eins og í øllum húsarhaldum, at av og á skulu frystiboksir avísast og vaskast. Flutt verður runt uppá innihaldið, sum verður sorterað og flutt úr einari boks í aðra.  Annað, ið hevur ligið í so leingi í boksini, verður koyrt burtur.

Í dag er bláa enska bíblian ikki longur til. Her hendi tað, at Kaja, kona Sonny, av óvart er komin til at burturbeina ensku bíbliuna saman við gomlum frystivørum. Tað er ikki altíð, man veit, hvat er í gomlum frystiposum, tá boksir verða tømdar.

Enska bíblian hevði annars ligið í frystiboksini heima við hús í meiri enn 30 ár.

## Amerika-rutan

Sjálvur hevur Sonny Johannesen eitt boð uppá, hvussu tað kundi bera til, at enska bíblian endaði á dekkinum umborð á Ljósafelli.

Á Hatton Bank, har Ljósafelli royndi á 900 metra dýpi, er júst sama øki, har Amerika-rutan gongur tvørtur um Atlantshavið.

Tað, sum kann vera hent, er, at onkur umborð á einum ferðamannaskipi, antin við vilja ella av óvart, kann hava blakað bíbliuna fyri borð. Vanligt var fyrr, at ein bíblia altíð lá í øllum kømurum á gistingarhúsum. Tað sama var við skipskahúttum. Har lá altíð ein bíblia á borðinum ella í eini skuffu.

Møguliga kann onkur, sum ikki hevur dámað hesa tradítión, hava blakað bláu bíbliuna fyri borð.

Hetta er bara eitt skot um, hvør orsøkin kann vera, at Ljósafelli fekk eina enska bíbliu í tí eina hálinum á Hatton Bank.

Og sum tað stendur í bíbliuni: Alt forgongur, men Guds orð forgongur ikki.

# DØGURÐAUPPSKRIFTIR

*Tekstur og myndir: Beate L. Samuelsen*

## Blomkáls-gratin

- Eitt stórt blomkálshøvd ella tvey smærri
- 50 gr. smør
- 1 dl mjøl
- 3 1/2 dl kókandi heit mjólk
- 1 teskeið fínt salt
- ½ teskeið pipar
- 3 ella 4 eggjareyðar
- 3 ella 4 eggjahvítar
- 3 súpuskeiðir av rasp
- 25 g smørklíningar

Skola blomkálið væl. Kuta tað sundur í smærri tyssir og legg tey í eitt væl smurt eldfast fat. Set eina grýtu útá og smelta 50 gr. av smøri. Stoyt mjølið í og baka tilfarið saman við 3 1/2 dl kókandi heitu mjólkini.

Tak grýtuna av komfýrinum og lat deiggið kølna eitt lítið sindur og stoyt eggjareyðarnar, ein í senn. Rør tilfarið væl saman so hvørt, eggjareyðarnir eru stoyttir í. Salt og pipar verður latið útí.

Í eini øðrum ílati pískar tú eggjahvítarnar saman. Tá teir eru stívtpískaðir, verða teir vendir í grýtuni við deigginum.

Síðani verður deiggið stoytt omanyvir eldfasta ílatið við blommkáls-tyssunum.

Rasp verður at enda stroytt omanyvir blommkálsgratinið. Ovast í fatið verða nakrir smáir smørklíningar (smørklattir) lagdir her og har.

Set eldfasta fatið við blommkálstilfarinum inn í ovnin og bakað við 190 hitasttigum í uml. ein tíma.



Blommkáls-gratin hóskar sera væl afturvið t.d. hamburgarryggi og grønertrum.

## Skánskur hamburgarryggur

- Uml. 1 kilo av hamburgaryggi
- 1 1/2 dl av pískiróma
- Eitt vet av rivnari piparrót
- 1 dós við ananasdálum
- Salt
- Pipar
- Rasp
- Eitt sindur av siroppi

Smyr hamburgarryggin við einum tjúkkum lagi av siroppi og stroy eitt tunt lag av rasp omaná.

Set steikina í heitan ovn, uml. 200 hitastig, í ein 1 tíma.

Pískað róman og smakka hann til við eitt sindur av rivnari piparrót.

Legg stokta hamburgarryggin á eitt severingsfat. Legg ananaskivurnar runt framvið steikini og legg ein lítlan topp av piparrótsrómanum mitt í hvønn ananasdála.



*Norröna liggur í kavaklædda Seyðisfirði*

# Ársfrágreiðing
# váríð 2024-váríð 2025

Longu tveir dagar eftir seinasta aðalfund LPs 20. apríl 2024 á Hotel Brandan, skipaði Smyril Line fyri fyrstu ferð fyri einum serligum "Eldra-túri" til Íslands. Við á ferðini 22. til 25. apríl 2024 vóru 130 pensjónistar. Longu fyrsta kvøldið helt undirritaða fyrilestur um Landsfelag Pensjónista og greiddi frá dagliga virkseminum og teimum uppgávum, sum áliggja felagnum.

Skrivarin Gunnleyg Durhuus greiddi við orðum og myndum nágreiniliga frá blaðnum Eldri. Í sambandi við tiltakið høvdu vit lagt ymiskt tilfar frá Landsfelagnum fram, so áhugað kundu taka tað við sær.

Á somu ferðini helt Jógvan Fríðriksson, bispur, tveir fyrilestrar. Annar kallaðist "Eldast við gleði" og hin "Virkin sum eldri".

Á ferðini skipaði Smyril Line fyri sjavskappingum og bindiskeiði, og Vestmenn syrgdu hvørt kvøld fyri felagssangi og dansi. Á Seyðisfirði vóru útferðir gjørdar við føroyskum bussum.

### Vár-tiltak

Hósdagin 2. mai 2024 var Landsfelag Pensjónista boðið at standa fyri einum eldratiltaki á Torginum í SMS, sum Marknaðardeildin tók sær av. Við í panelinum vóru umframt forkvinnuna í Landsfelag Pensjónista, Ingeborg Vinther,

næstforkvinna í Landsfelagnum og forkvinna í Pensjónistafelagnum í sunnaru helvt av Suðuroynni, Alfred Olsen, nevndarlimur í Landsfelag Pensjónista og formaður í Eldrafelagnum á Toftum, og Eirikur Suni Danielsen, leiðari í Tilhaldinum í Havn. Tiltakið eydnaðist avbera væl, halda vit sjálvi.

## Aldursmismunur

Fundur var 3. sept. 2024 við sjúkrarøktarfrøðingar 60+ um aldursmismun. Trupulleikin hjá eldri limunum var, at fakfelag teirra aftaná aðalfund høvdu gjørt av, at eldri limir ikki longur sluppu at stilla upp ella atkvøða á aðalfundi.

Landsfelag Pensjonista greiddi ónøgdu limunum frá um AGE Platform Europe, ið ger eitt stórt arbeiði í Europaparlamentinum í Bruxelles í smb. við strikan av aldursmismuni. Hetta er nevniliga ein stórur trupulleiki runt um í Europa, og ikki minst í øðrum londum uttanfyri Europa, og stríðir ímóti mannarættindum um at gera mismun á fólki.

Sjúkrarøktarfrøðingar 60+ fóru aftaná fundin við Landsfelag Pensjónista alt fyri eitt í gongd við arbeiðið at fáa aldursmismunin í felagnum strikaðan. Hetta eydnaðist eldru limunum aftaná atkvøðugreiðslu á seinasta aðalfundinum felagsins í mars 2025, har 60+ limirnir við einum meiriluta fingu mistu rættindi síni aftur.

## Eldrafelagið Hugni og Suðuroyggin

Í smb. við, at Eldrafelagið Hugni í Klaksvík hevði aðalfund í Smæruni 10. sept., vóru forkvinna og skrivari Landsfelag Pensjónista boðin við at greiða frá arbeiðinum, sum Landsfelagið fæst við.

Á heysti 2024 vitjaðu nevndarlimir og skrivari Landsfelagsins í Suðuroynni, har pensjónistafeløgini bæði í oynni skipaðu fyri felags limafundi í Vági.

Við okkum var Robert Vilhelmsen. Hann greiddi frá galdandi pensjónsskipan og svaraði spurningum. Síðani greiddu umboð Landsfelagsins frá dagliga virksemi felagsins.

Fundurin skuldi upprunaliga havt verið í Suðuroynni fyri langari tíð síðani, men av ymsum orsøkum hevur fundurin ferð eftir ferð verið útsettur.

## Eldradagur á Toftum

Eldrafelagið Nón í Runavík og Eldrafelagið á Toftum átóku sær í felag uppgávuna at skipa fyri árliga Eldradegnum, sum var hildin 14. sept. í fimleikahøllini í Tofta skúla. Hetta varð gjørt samstarvi við Landsfelag Pensjónista.

Um 400 pensjónistar úr øllum landinum hittust henda illveðursdagin til eitt sera hugnaligt og væleydnað tiltak. Árligu eldradagarnir, sum Landsfelagið skipar fyri saman við limafeløgum er ikki bara ætlað limum, men eitt tiltak fyri allar pensjónistar í landinum. Eldradagurin 2025 verður í Skopun 20. september. Tað eru Pensjónistafelagið Kvøldarsól í Skopun og Sunda Pensjónistafelag, sum saman við Landsfelagnum í felag hava átikið sær uppgávuna.

## NSK-fundir

6. og 7. mai og 23. og 24. oktober 2024 hevði NSK, Nordisk Samarbets Komite, hálvársfundir ávikavist í Stockhólmi og Helsingfors. NSK er

norðurlendskur pensjónistafelagsskapur, sum Landsfelag Pensjónista er limur í og hevur verið tað í mong ár.

Á aðalfundinum hjá NSK í mai vóru m.a. roknskapur og aðrar frágreiðingar felagsins góðkendar. Um 20 fólk úr øllum norðurlendsku limalondunum hittust á fundunum báðum.

Tað eru ikki bestu kor, norðurlendskir pensjónistar liva undir alla staðni. Sparingar innan tað almenna hava rakt okkara aldursbólkar í Norðanlondum meint. Serstakliga er Finnland hart rakt, frættu vit á Hanaholmen-skeiðs- og fundardeplinum í finska høvuðsstaðnum.

Vit fingu rós fyri okkara virksemi. Serliga er tætta sambandið millum Landsfelag Pensjónista, politisku myndugleikarnar og fjølmiðlarnar her heima nakað, sum norðurlendsku pensjónistarnir sakna stórliga í teirra londum.

Finska pensjónsskipanin er ógvuliga torskild, ja, so torskild, at sjálvt finsku luttakararnir máttu viðganga, at teir høvdu ringt við at skilja hana. Finsku NSK-umboðini gera nógv fyri at fáa vent gongdini á beint aftur.

## Royndarskipan í Suðuroynni

Margit Stórá, undanfarna landsstýriskvinna við heilsumálum, tók í fjør vár stig til at gera royndarskipanir um, hvussu heilsutænastur í Suðuroy kunnu skipast við atliti til at tryggja suðuroyingum dygdargóðar heilsutænastur við hægstu heilsufakligu góðsku. Endamálið var, at betra um heilsustøðuna hjá suðuroyingum í tøttum samstarvi við Heilsumálaráðið. Tað snýr seg serliga um tey, sum hava størstan tørv á heilsutænastum, t.v.s. eldri fólk, fólk við varandi sjúkum og fólk við serligum tørvi og avvarðandi teirra. Tá royndartíðarskeiðið er liðugt, skulu hendan og aðrar royndarskipanirnar eftirmetast. Úrslitini frá royndarskipanunum skulu brúkast til at menna heilsuøkið í Suðuroynni og síðani víðkast til onnur øki.

Í arbeiðsbólkinum hava vit havt tvey umboð, Ingeborg Vinther, úr Vági, og Martin S. Eidesgaard frá Høft á Tvøroyri.

## Samhaldsfastafundur

Í november sendi Landsfelag Pensjónista stýrinum fyri AMEG (Samhaldsfasta) eitt skriv, har vit sum pensjónistar kendu okkum snýttar fyri prísjavning av Samhaldsfasta. Av røttum áttu vit at fingið eina hækking av Samhaldsfasta, ið var nærum tríggjar ferðir størri enn hækkingin 1. januar 2025, nevniliga kr. 328 pr. mánað fyri at samsvara við prísvøkstrinum í tíðarskeiðnum nov. 2021 til aug. 2024. Stýrið fyri AMEG (Samhaldsfasta) kunngjørdi í september í 2024, at mánaðargjaldið til pensjónistarnar fór at hækka við 130 kr. um mánaðin í 2025, tvs. úr kr. 6.325 til kr. 6.455 um mánaðin. Um rætt var rætt, áttu vit at fingið kr. 6.783 pr. mánað.

Í sama skrivi heittu vit á stýrið fyri AMEG um at endurskoða útgjaldið fyri 2025, soleiðis at tað í minsta lagi varð prísjavnað sambært prísvøkstrinum frá nov. 2021 til aug. 2024. Haraftrat heittu vit á avvarðandi myndugleika um at avtaka dupultskattingina, tvs. skattafrítt inngjald til Samhaldsfasta ella skattafrítt



***Nógv fólk vóru á aðalfundinum 12. apríl 2025***

útgjald úr grunninum. Men har er einki hent. Tað sær ikki út til, at nakað verður broytt.

Nevndin í Landsfelagnum var stutt undan jólum 2024 boðin á fund við nevndina fyri Samhaldsfasta, Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnin, AMEG, sum politikarar einki eiga í, men hava sett seg á.

Sum pensjónistar kenna vit okkum snýttar fyri hópin av peningi, serliga, tá vit hugsa um allar aðrar lønarbólkar, ið hava fingið ein munandi lønarvøkstur í mun til prísvøksturin, inflatión, men hetta er eftir øllum at døma ikki galdandi fyri pensjónistar.

Á fundinum fingu vit at vita, at har var ikki nøkur hjálp at heinta. Nevndin segði seg verða valda til "bara" at umsita kassan, altso Sam-haldsfasta, soleiðis at grunnurin ikki tømist, men búskaparliga skal klára seg, so landið ikki fer av knóranum, tí talið av pensjónistum gerst alsamt størri og størri. Og vit kosta so nógv.

Tí fór stýrið ikki at broyta útgjaldið í 2025. Stutt og greið boð til okkum pensjónistar frá Stýrinum aftaná tey mongu skriv, vit hava sent.

## Hoyringsfundir

Landsfelagið hevur verið boðsent til fleiri hoyringsfundir við politisku myndugleikarnar t.d. við Trivnaðarnevnd løgtingsins um lógina um pensjónsumstøðurnar hjá hjúnum ella samlivandi, tá annað teirra fer hesum foldum frá. Nú kann tann eftirsitandi varðveita pen-sjónina og viðbótina í 3 mánaðir aftaná, at makin er farin, og ikki sum fyrr. Um t.d. pensjón-in var útgoldin 27. í mánaðinum, skuldi pen-sjónin gjaldast inn aftur alt fyri eitt.

Bara her í mars hava vit aftur havt fleiri fundir við Trivnaðarnevnd løgtings, m.a. um eitt uppskot til samtyktar um eldraverju. Vit hava nevniliga ongastaðni at venda okkum, um vit sum eldri eru fyri harðskapi, tað veri seg sálar-ligum, likamligum, kynsligum, materiellum, fíggjarligum ella talgildum.

Talan er um eina eldraverju, t.d. ein stovn, har fólk í pensjónsaldri skulu kunna venda sær og fáa ta hjálp, tey hava fyri neyðini. Mann skal eisini kunna venda sær til stovnin anonymt. Vit hava havt fund við Trivnaðarnevndina um løgtingsuppskotið um hækkan av pensjóns-aldrinum – eitt uppskot, sum vit eru harðliga ímóti og hava mælt politikarunum til ikki at taka undir við.

Í vetur havt vit havt fund við umboð fyri Heilsu-málaráðið í sambandi við nýggja heilsupolitikkin hjá sitandi samgongu um fyribyrging, heilsu-frama, kanningar, viðgerðir, sjúkrarøkt og endurvenjing. M.a. hava vit havt fund um atkomuviðurskifti hjá eldri fólki, tá vit fara til kommunulækna.

Í januar 2025 heitti Heilsumálaráðið á Lands-felag Pensjónista og nógv onnur feløg um okkara hugsan um ásetan av ymsum reglum innan Sjúkrahúsverkið, nú tey ætla at menna tað til eitt universitetssjúkrahús.

Hesum segði nevndin seg einki hava ímóti annað enn, at tað fyrst og fremst skal koma sjúklingunum til góðar við tí endamáli, at eitt universitssjúkrahús skal kunna veita enn betri viðgerð enn frammanundan og ikki bara virka sum ein vanligur klekingarstovnur til starvsfólk.

## Áhugaverdur formansfundur

Væl eydnaður formansfundur var á Hotel Djurhuus 21. januar í ár, 2025, har umboð fyri flestu limafeløgini tóku lut. M.a. greiddi Albert Isfeld, arkitektur, frá framtíðar íbúðarbygging við atliti til at minka um risa høga byggikostn-




***Markus Hvannastein, tannlækni, greiðir frá tannheilsu á formansfundi 21. jan. 2025***

aðin, og fyri at ungfólk skulu hava ein betri tjans at seta búgv.

Uppskotini hjá Albert Isfeld eru løgd út á heimasíðu Landsfelag Pensjónista.

Tíverri meldaði stjórin í Bústøðum, Jógvan Ósá, avboð til formansfundin vegna sjúku sama dag, sum fundurin varð hildin.

## Tannheilsan hjá eldri fólki

Markus Hvannastein, formaður í Tannlækna-felagnum, greiddi á formansfundinum frá vánaligu tannheilsuni hjá eldri fólki. Hetta metir Tannlæknafelagið vera ein stóran trupulleika. Serliga verður hugsað um búfólk, ið búgva á røktarheimum. Í dag hava fleiri av teim gomlu sínar egnu tenn, sum skulu passast væl fyri ikki at forfarast av heilivági, sjúku o.ø. Haraftrat eru tær týdningarmiklar hjá eldri fólki fyri at fáa

tugt matin ordiliga, annars gongur tað út yvir sodningina.

Í Danmark hava kommunurnar nógva staðni eina tannlæknaskipan við tannlæknastovum á pleyguheimum, ætlað búfólki, ið ikki kunnu flytast av stovninum.

Tannheilsan hjá eldri er eitt mál, sum Tannlæknafelagið fegið vil hava loyst, men kennir seg onkusvegna einsamalt.

Í Danmark er t.d. Ældresagen við í einum samstarvi við tannlæknar. Tí hevur føroyska felagið biðið um samstarv við Landsfelag Pensjónista fyri tann vegin at seta fokus á trupulleikan og fáa hann loystan.

Á formansfundinum í januar greiddi Alfred Olsen, nevndarlimur í Landsfelag Pensjónista, eisini væl og virðiliga frá Samhaldsfastafundinum, sum vit høvdu í Landsbankanum í desember.

Tøl í sambandi við frágreiðingina hjá Alfred Olsen um fundin við Stýrið fyri Samhaldsfasta, síggjast á heimasíðuni hjá Landsfelag Pensjónista, Eldri.fo.

## Virksemi hjá feløgum

Eitt annað áhugavert mál á fundarskránni á formansfundinum vóru frágreiðingar um virksemi, sum fleiri av umboðunum fyri limafeløgini greiddu frá.

Ójavnt er, hvussu feløgini arbeiða, summi hava fund seinnapartar, onnur hava fund um kvøldarnar, uppaftur onnur hava felags morgunmatarborð ávísar dagar.

Nøkur feløg fáa stuðul frá kommununi, onnur fáa ikki eitt oyra, o.s.fr.

Sunda Pensjónistafelag hevði gjørt nógv burturúr formansfundinum. T.d. vísti forkvinnan í Sunda Pensjónistafelag, Vibeke Ingvarsson, okkum eina heimasíðu við Power Point. Heimasíðan verður javnan dagførd, so allir limir felagsins kunnu síggja, hvat fer fram.

## Ársveitslan

Leygardagin 29. mars 2025 skipaði Landsfelag Pensjónista fyri ársveitslu. 317 limir úr øllum landinum hittust í Dansifrøi í Havn til eitt sera hugnaligt og væleydnað kvøld saman við Ólavi Højgaard og hansara spælimonnum. Vit hava longu bílagt veitsluhølið í Dansifrøi til ársveitsluna komandi ár. Hon verður leygardagin 21. mars 2026, og tónleikin fara Ólavur Højgaard og hansara manning aftur at taka sær.

## Blaðið Eldri

Blaðið Eldri nr. 9 kom út í november 2024, og komandi blað kemur út í heyst.

***Tórshavn 12. apríl 2025***
***Beate L. Samuelsen, forkv.***

***Myndir: Gunnleyg Durhuus***

# NSK-fundur í Noreg í mai

**Nakrir nevndarlimir smittaðir við Korona undan nevndarfundinum**



*Í mai hevði NSK, Nordisk Samarbets Komité, ársfund í norska býnum Lillestrøm, sum liggur nakað uttanfyri Oslo.*

*Tekstur: Beate L. Samuelsen*
*Myndir: Gunnleyg Durhuus*

Dagarnar 6. og 7. mai var fyrri hálvársfundurin í NSK hildin í lítla norska býnum Lillestrøm, sum liggur eitt sindur uttanfyri Oslo.

Í mong ár hevur Landsfelag Pensjónista verið limur í norðurlendska pensjónistafelagsskapinum NSK, sum er ein stytting av Nordisk Samarbets Komite.

Nevndin í NSK hittist tvær ferðir um árið. Fundirnir verða hildnir eftir tørni millum limalondini, Svøríki, Finnland, Noreg, Danmark, Ísland og Føroyar.



***Nakrir av nevndarlimunum í NSK. Frá vinstru: Oddny Árnadóttir, Ísland, Beate L. Samuelsen, Føroyar, Gunnleyg Durhuus, Føroyar, Drífa Sigfusdóttir, Ísland, Arne Halaas, Noreg, og Liza di Paolo-Sandberg, Svøríki.***

Undan hvørjum fundi skulu limafeløgini senda inn eina skrivliga frágreiðing um, hvat hent er innan eldraøkið í teirra landi síðani seinasta NSK-fund.

Haraftrat fær hvørt einstakt umboð høvi á nevndarfundinum líka at greiða nærri frá skrivligu frágreiðingini ella frá onkrum, sum kann vera hent seinastu dagarnar beint undan nevndarfundinum.

## NSK rakt av Korona

Á aðalfundinum hjá NSK í mai vóru m.a. roknskapur og aðrar frágreiðingar felagsins góðkendar umframt val av nevnd fór fram.

Landsfelag Pensjónistar er eisini umboðað í nevndini.

Vit skuldu havt verið um 20 fólk úr øllum norðurlendsku limalondunum á fundinum. Men av tí, at Korona í vár aftur varð farið at gera um seg og hevði rakt onkrar av nevndarlimunum, vóru vit ikki fullmannað.

Vit fingu avrikað tað, vit skuldu, umframt at fleiri fyrilestrar vóru hildnir. Allir høvdu fyrilestrarnir okkurt við norska eldraøkið at gera.

Annar árligi nevndarfundurin hjá NSK í ár verður í Keypmannahavn 5. og 6. november.

# Frá astmaheimi til heilsustovn

**Astmaheimið í Kongsberg var gáva frá norðmonnum til danska Reyða Kross, sum takk fyri hjálpina undir 2. heimsbardaga.**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***

Sum eina tøkk til danska Reyða Kross fyri hjálpina til norsk børn undir øðrum heimsbardaga, bygdu norðmenn síðst í 40unum ein stóran bygning. Bygningurin varð latin Reyða Krossi í Danmark, soleiðis at donsk astmasjúk børn kundu koma her at søkja sær heilsubót við at anda fríska og reina luft í seg.

Astmaheimið lá einar 8 km uttanfyri Kongsberg, sum liggur einar tveir tímar við bili úr Oslo. Danski Reyði Krossur átti og rak Astmaheimið í Kongsberg frá 1950 til 1979. Her var pláss fyri 60 donskum børnum, sum av heilsuávum kundu fáa hjálp.

Um pláss var tøkt, bar eisini til hjá føroyskum og norskum børnum at koma á Astmaheimið. Tá danski Reyði Krossur í 1979 steðgaði virkseminum á Astmaheiminum, var bygningurin lýstur til sølu. Men illa gekk at sleppa av við ognina. Langt um leingi varð hann seldur til ferðavinnuna.



*Einans 10 ár gomul varð eg í august 1957 send til Noregs at søkja mær heilsubót á Astmaheiminum í Kongsberg. Til ferðina bant mostur mín, Magnhild Olsen, mær eina lekra, heita, bleyta troyggju í føroyskum tógvi, sum hon sjálv hevði nappað. Myndin er tikin í Gamla Bókhandli á Vaglinum undan Noregsferðini við Tjaldrinum hjá Skipafelagnum.*

Seinni keyptu Adventistar bygningin, sum í dag eitur Fredheim, og har fólk kunnu koma at leita sær heilsubót av ymsum slag.




## Buldrut heimferð

Einans 10 ár gomul í 1957 varð eg send á Astmaheimið í Kongsberg. Orsøkin var, at eg var sera ring av astma. Í nærum eitt hálvt ár búði eg har. Vit vóru 60 børn í aldrinum 2-16 ár. Kom einsamøll heimaftur á fyrsta túrinum hjá Tjaldrinum í himmalsins ódnarveðri beint aftaná nýggjár í 1958.

Tá tók ferðin úr Danmark tríggjar dagar. Vindferðin var 12. Tað var tað sama sum orkan eftir gamla vindorkuskalanum, er mær fortalt. Ein øgiliga buldrutur rullutúrur.

Minnist, hvussu bangin eg var. Lá einsamøll í eini tveymans kahútt á 1. klassa. Tað var ikki serliga stuttligt hjá einum 10 ára gomlum barni, sum bara hevði ein lítla dukku við sær á ferðini. Dukkan hevði eisini fylgt mær undir uppihaldinum á Astmaheiminum.

Á túrinum heim stakk kahútsjomfrúin av og á høvdið inn um hurðina og spurdi, hvussu eg hevði tað.

## Mótstøðuførið skuldi styrkjast

Øll starvsfólkini á Astmaheiminum vóru donsk, bæði fyristøðukvinnan, barnalæknin, lærarinnan, sjúkrasysturin, barnapleygirskurnar, o.o.

Læknin fann við ymsum barnakanningum fram til, hvat hvørt eintakt barn var ovurviðkvæmt fyri, t.d. dusti, húsdjórum, fjøður, grasi.

Síðani varð vaccina, ætlað hvørjum einstakum barni, framleidd.

Heimafturkomin skuldi man hvørja viku í fleiri ár hava eina innspræning í annan hvønn arm. Hetta skuldi styrkja mótstøðuførið hjá barninum.

Heimaftur komin var tað landslæknin Hanus Debes Joensen, sáli, sum sproytaði meg øll hesi mongu árini. Mangan stóð eg bara í durunum í viðtalurúmi hansara, meðan hann í einum fyri meg langum fríkorteri við spísku nálini stakk meg. Tíðin var jú knøpp, tí eg gekk í skúla.

## Ein muss og einki roks

Pápi fylgdi mær yvir til Noregs. Farið var úr Føroyum við Tjaldrinum umvegis Hetland til norska býin Kristiansand. Tað var rutan hjá Tjaldrinum tá í tíðini. Síðani við toki til Kongsberg við lítlum steðgi í Drammen. Har stukku vit inn á gólvið á Drammens Tidende at heilsa uppá táverandi blaðstjóran. Hann og pápi kendust.

Í Kongsberg búðu vit hjá mammubeiggja mínum, Harry Fonsdal og hansara familju í einar tveir dagar. Síðani gekk leiðin niðan til Astmaheimið, sum lá høgt uppi á einum silvurnámsfjalli, einar átta kilometrar uttanfyri Kongsberg. Pápi og mammubeiggin fylgdu mær niðan á Astmaheimið, har ein dama tók ímóti.

Í gongini fekk eg ein muss frá pápa. Síðani eitt farvæl við orðunum: "Síggjast aftur aftaná nýggjár". Og tað var tað.

## Frísk og rein luft

Einki meiri roks. Einki við at heilsa uppá starvsfólk ella onnur børn við somu sjúku sum eg. Heldur ikki vísti nakar okkum, hvussu heimið



***Eg kom einsamøll heimaftur við Tjaldrinum. Tá tók ferðin úr Danmark tríggjar dagar. Vindferðin var 12. Ein øgiliga buldrutur rullutúrur.***

var innrættað, ella hvat fór at henda komandi hálva árið. Einki.

Ikki dugdi man danskt heldur. Ikki annað enn tað, man hevði lært við at lesa í donskum lesibókum í Nonnuskúlanum í Havn.

Eg skuldi byrja í 5. flokki í Nonnuskúlanum 18. august hetta árið. Men soleiðis bleiv ikki. Í staðin gekk eg í skúla í einum kjallararúmi undir Astmaheiminum nakrar tímar hvønn dag saman við eldru børnunum. Yngru skúlabørnini gingu í einum bólki fyri seg. Soleiðis var skilið eisini í fleiri smábygdum í Føroyum fyrr.

Eg lærdi einki av undirvísingini, ikki annað enn at skriva brøv heim.

Komin heimaftur, fór eg aftur í mín 5. flokk og helt fram, sum um eg slett ikki hevði verið burturstødd fyrra hálva skúlaárið.

# NORSKA HEILSUHOTELLIÐ FREDHEIM LIVSSTILSSENTER

**Endamálið við uppihaldi á norska heilsuhotellinum í Kongsberg fyrrverandi Astmaheiminum, er at eta heilsugóðan mat, fáa fríska luft og ganga túrar í vakra skógarøkinum. Og so tað alra besta: At tapa seg – eisini tá man er heimaftur komin**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Myndir: Sámal Bláhamar, Leivur Sørensen, Kári við Rættará og Fredheim Livsstilssenter***

Síðani 1987 hevur norska Adventista samkoman átt og rikið gamla Astmaheimið, sum hevur broytt navn til Fredheim Livsstilssenter.

Her er pláss fyri í mesta lagið 30 luttakarum, sum allir hava eittans ynski: At betra um heilsuna.

Áhugin at koma á heilsuhotellið er stórur. Millum tey, sum hava verið her, eru fleiri føroyingar. Summir hava verið her fleiri ferðir. Felags afturmeldingin er, at latið verður sera væl at uppihaldinum.

Fredheim Livsstilssenter hevur eina røð av tilboðum, sum lutað eru upp í smærri og longri skeið frá vanliga sjey døgum upp til tíggju dagar.



*Tveir av teimum, sum nýliga hava verið á Fredheim Livsstilssenter eru pensjónistarnir Sámal Bláhamar og Leivur Sørensen*



*Fredheim Livsstilssenter liggur uml. 8 km uttanfyri norska býin Kongsberg*

Nøkur heilt fá skeið eru munandi stytri, einans fimm ella seks dagar.

## Føroyingar á Fredheim

Tveir av teimum, sum nýliga hava verið á Fredheim Livsstilssenter eru pensjónistarnir Leivur Sørensen, fyrrverandi matrikulmaður, skipari, ættaður av Viðareiði, sum býr í Syðrugøtu, og Sámal Bláhamar, ferðaleiðari, sum býr í Havn. Konur teirra, Anna Kathrina og Tórharda Bláhamar, vóru eisini við.

Hetta var fyrsta vitjanin hjá Leivi og Onnu Kathrinu á Fredheim, og onnur ferðin hjá Sámali og Tórhardu. Sonurin Fríðrik var eisini við á fyrru ferðini.

Felags fyri tey øll var, at tey fegin vildu styrkja um órinsverjuna, (immunverjuna/mótstøðuførið).

Ein dagsskrá sá t.d. soleiðis út, at útpurrað var við sangi og livandi tónleiki á gongini uttanfyri



*Kokkurin í ferð við at fyrireika ein heilsugóðan døgurða*

kømurini. Síðani var felags morgunvenjing, morgunmatur, morgunandakt, fyrilestur, undirvísing, døgverði, matundirvísing, stólafimleikur, nátturði, hugni og prát og endaði hvør dagur við eini kvøldandakt.



## Lívið fekk eina vend

Ein føroyingur, sum fleiri ferðir um árið plagar at vitja Fredheim Livsstilssenter, er 77 ára gamli vestmenningurin Fróði Durhuus, sum býr í Noreg.



Hann fekk í 2020 staðfest krabbasjúku. Hetta hendi, meðan hann passaði konu sína, Anthoniu, sum var álvarsliga sjúk í næstan fimm ár.

Hann noyddist hesa tíðina eisini sjálvur gjøgnum bæði skurðviðgerð, kemoterapi og stráluviðgerð.



Tað var ein tung og trupul tíð hjá honum at koma fyri seg aftur, aftaná at hann misti konuna í mai 2022. Hetta var mitt í Coronatíðini.

Ein teirra, sum plagar at vitja heilsuhotellið í Kongsberg, greiddi Fróða frá tí hjálp, sum man kundi fáa har, og varð hann boðin at koma á Fredheim Livsstilssenter at leita sær heilsubót aftaná alt tað, sum hevði verið honum fyri seinnu árini.



Hann tók av og fór í juni 2023 til Kongsberg. Har fekk hann sera góða uppfylging við styrkisvenjing frá m.a. fysioterepeuti.



*Ein føroyingur, sum fleiri ferðir um árið plagar at vitja Fredheim Livsstilssenter, er 77 ára gamli vestmenningurin Fróði Durhuus, sum býr í Noreg.*

**Lætnaður fleiri kilo**

Uppihaldið var sum balsam fyri sál og likam. Longu í oktober sama ár vitjaði hann fyri aðru ferð har. Í fjør var hann aftur tvær ferðir á Fredheim Livsstilssenter.

Uppihaldini á heilsuhotellinum gjørdu, at Fróði fekk so góða vitan um heilsu gjøgnum fyrilestrar og kostvegleiðing frá bæði læknum, fysioterapeutum og starvsfólki, at hann síðani hevur greitt nógvum øðrum frá egnu jaligu úrslitunum.

Serliga setir hann stóran prís uppá gongutúrarnar saman við leiðarum og øðrum, soleiðis at man ikki er einsamallur, men alla tíðina hevur ein at ganga saman við.

Uppihaldini á norska heilsuhotellinum hava gjørt, at Fróði Durhuus í sambandi við hvørja vitjan hevur mist uml. fýra kilo. Tað hevur samstundis ført við sær, at hann hevur hildið fram við at lætna, meðan hann hevur verið við hús.

Hetta hevur so aftur ført við sær, at hann næstan er vorðin vegetarianari í gerandisdegnum.



*Føroyingar á gongutúri í økinum við Fredheim Livsstilssenter saman við sjúkrarøktarfrøðinginum*





***Leskiligir og sunnir rættir vóru á matarlepanum hvønn dag***

***Gongutúrarnir vóru nógvir***

Ikki bara vektin er minkað. Eisini blóðroyndirnar hava víst betri úrslit nú enn frammanundan. Síðstu kanningarnar vístu, at hann er lektur av krabbameini.

Øll uppihaldini á Fredheim Livsstilssenter hava tilsamans betrað um heilsuna hjá vestmenn-inginum í Noreg, sum í dag kennir seg bæði yngri og betri fyri í allar mátar.

## Einki stress

Einki fer fram við skundi á Fredheim Livsstils-senter. Alt gongur friðarliga og róliga fyri seg, alt eftir, hvat hvør einstakur orkar. Einki stress. "T.d. gingu vit hvønn dag aftaná døgverða ein túr rundan um ognina fyri at sodna tað, sum var farið niðurum", sigur Leivur Sørensen. Sámal Bláhamar leggur aftrat, at tá tey gingu túrar í tí náttúruvakra skógarøkinum, har Fred-heims Livsstilssenter liggur, vóru starvsfólk altíð við.

"Øll ganga ikki líka skjótt. Summi orka ikki so væl at ganga og mugu hvíla seg av og á. Tí fylgdi ein bilur vanliga við okkum, so høvi var at hvíla beinini", sigur hann.

Tveir læknar eru knýttir at heilsuhotellinum umframt sjúkrasystrar, fysioterapeutar, køksstarvsfólk og húsavørðar. Eisini skal skil haldast á fíggjarstøðuni. Tað tekur ein grannskoðari sær av.



***Hjúnini Sámal og Tórharda Bláhamar við soninum, Fríðrikki, í millum sín***



***Heilsuviðgerð á saunaøkinum á Fredheim Livsstilssenter***

## Øll hjálpast at

Leggjast kann aftrat, at starvsfólkini komu alla staðni frá, t.d. Noregi, Danmark, Svøríki, Hollandi, Kanada, Týsklandi, bara fyri at nevna nøkur lond.

Eisini ein føroyingur var millum starvsfólkini. Tað var Henrietta Jørgensen, dóttir Óla Olsen, gift og búsitandi í Danmark

Øll starvsfólkini taka sær av øðrum uppgávum enn bara av tí, tey eru útbúgvin til, og øll hjálpast at.

Sum dømi nevna Leivur og Sámal, at onkran morgun var tað annar læknin, sum las andaktina, onkran annan dag hin læknin, ein fysioterapeutar ella onkur heilt annar.

"Um kvøldarnar var tað heldur ikki altíð sama starvsfólk, sum eina løtu setti seg við einum guittar at undirhalda okkum við. Ta uppgávuna skiftust tey øll um," siga báðir við ein munn.

## Vandamikil SOS-kostur

Bæði við komu og tá farið verður heimaftur, verða blóðroyndir tiknar av hvørjum einstøkum gesti fyri at kanna, hvussu til stendur við kolesteroli, blóðsukri umframt blóðtrýsti, vekt, o.ø. Sámal leggur aftrat, at tað snýr seg um ikki at fáa SOS-kost niður í seg: **S**alt, **O**lju (feitt), **S**ukur. Hetta eru trý sløg av tilfari, sum vit ikki hava gott av at eta, men sum tíanverri eru ein partur av dagliga kostinum í dagsins húsarhaldi.

Tað, sum dentur verður lagdur á við einum uppihaldi á Fredheim Livsstilssenter, er at eta heilsugóðan mat, fáa fríska luft, ganga túrar og brúka væl útgjørda venjingarhølið.

Her eru eisini hitapottar og høvi at fáa infrareyða sauna, sum skal vera ógvuliga gott fyri húðina. Harumframt ber til at fáa hydroterapi, sum er ein vatnviðgerð.

Hydroterapi sigst vera gott fyri alt. Maðurin aftanfyri hesa viðgerð sigst vera eysturíkarin

Vincent Priessnitz, sum livdi frá 1788 til 1851. Hann setti á stovn heilsubótarbaðistøð í Gräfenberg í Týsklandi.

Viðgerðin fevnir um heit bað, ísbað, undirvatns-massagu og venjingar í vatni við mineralum ella oljum.

Hydroterapi verður nýtt í sambandi við linna av eini røð av sjúkum, so sum eksem, psoriasis, uppafturvenjing eftir skurðviðgerð, skaðar, vøddatrupulleikar av ymsum slag, o.m.a.
Hetta var Leivur, sum er dyppari í Syðrugøtu, sera glaður fyri.

## Í kirkju

Eftirsum adventistar eiga Fredheim Livsstils-senter er leygardagurin tað sama sum okkara sunnudagur. Tey halda  leygardagin heilagan á sama hátt, sum vit halda sunnudagin. Høvi var tí hjá luttakarunum at fara í kirkju í Kongsberg leygardagar.

"Tað gjørdu vit, meðan vit vóru á Fredheim Livsstilssenter", upplýsir Sámal.

Fyrru ferðina, Sámal og Tórharda vóru á Fred-heim Livsstilssenter, tyktist tað heldur møðsamt at koma frá flogvøllinum í Oslo og til Kongsberg við bussi, toki og bili. Men aðru ferðina, sum var í september, var longu lættari. Tá stóð bilur fyri teimum. Tað var munandi meiri ómakaleyst, hóast tað kostaði einar 300 kr. fyri hvønn.

## Hjálp til onnur

At siga frá uppihaldinum á Fredheim Livsstils-senter halda Leivur Sørensen og Sámal Bláhamar er ein sjálvfylgja aftaná at fingið heilsubót og síðani tapt fleiri kilo. Báðir vilja teir við hesi frásøgn, siga frá teirra uppihaldi á heilsuhotellinum og harvið kunna veita øðrum hjálp.

Teir hava verið so djarvir, at bíleggja nøkur pláss til áhugaðar føroyingar til eitt 10-daga skeið á Fredheim Livsstilssenter frá 10. mai til 20. mai 2026. Hetta eru somu dagar, sum flogrutan hjá Atlantic Airways flýgur til og frá Oslo. Tjóðardagin 17. mai verður høvi hjá føroyingum í føroyskum klæðum at vera við í veitslutiltøkunum í Kongsberg.

"Konan og eg hava verið á nógvum heilsustøð-um í Norðurlondum, m.a. tí konan skuldi tapa seg. Men einki av øllum hesum uppihaldum kann samanberast við uppihaldið á Fredheim Livsstilssenter", sigur Sámal Bláhamar.

Á Fredheim Livsstilssenter eru øll starvsfólkini útlærd innan hvør sítt heilivágsøki.



***Føroyingar á veg í kirkju í Kongsberg***

# AVSLÁTTARAVTALUR HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA

NOVEMBER 2025

**Landsfelag Pensjónista hevur fingið nógvar góðar avsláttaravtalur við handlar, hotell, matstovur og aðrar fyritøkur.**

**Limirnir í teimum 16 lokalfeløgunum kring landið kunnu fáa avsláttur úr 5% upp í 50% av vørum og tænastum frá ymsum handlum, hotellum, matstøðum og øðrum fyritøkum kring landið.**

***Avslátturin er treytaður av, at limur vísir fram persónligt limakort frá Landsfelag Pensjónista.***

**Limirnir fáa limakort við at venda sær til sítt lokalfelag og nýggir limir við at tekna seg hjá lokalfelagnum.**

**Avsláttaravtalurnar liggja eisini úti á heimasíðuni www.eldri.fo.**

## Í Tórshavn

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nice** | 15% | Av barnaklæðum 0-16 ár | 270200 |
| **Hoyrnin** | 10% | Av hoyritólum | 321731 |
| **Hennara**<br>Kvinnuklæðir | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 274075 |
| **Tignir - væl klæddir menn**<br>Mannfólkaklæðir | 15% | Av øllum vørum | 292900 |
| **Fótbúni**<br>Skósøla | 10% | Av øllum vørum | 311705 |
| **Gunnvá**<br>Kvinnuklæðir | 15% | Av øllum vørum | 214206 |
| **Toscana** | 10% | Mán. til hósd. og sunnudag | 211109 |
| **Angus Steakhouse** | 10% | Av øllum mati mánadagar | 717777 |
| **Hotel Hafnia** | 15% | Frokostbuffet í matstovuni og av øllum á Kafé Kaspar | 313233 |
| **Hornið, SMS** | 10% | Av øllum vørum | 233423 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Jógvan Weihe** | **10%** | Av øllum vørum | 353897 |
| **Hjá Kissa**<br>Mannfólkaklæðir | **15%** | | 311395 |
| **Bailine** | **10%** | Av viðgerðum | 280554 |
| **Tórshavnar Maskinhandil** | **15%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 313442 |
| **Hitapumpur.fo** | **10%** | Av hitapumpum við montering.<br>Um 3 keypa saman | 212204<br>312204 |
| **Touché**<br>Mótahandil | **10%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 603300 |
| **Nordcar** | **10%** | Av dekkum og felgum | 363738 |
| **P/F Waag** | **10%** | Av dekkum | 313666 |
| **SRI**<br>Máling | **10%** | Av øllum uttan glasvevi | 313030 |
| **in•tone clinic** | | Viðgerð við infrareyðum hitateppi 100 kr. Vødda- og pínuviðgerð 120 kr. | 516114 |
| **Salong Liljan**<br>Torfinsgøta 6 | **15%** | Hárviðgerð, mán.-fríggj. áðrenn kl. 13 | 314768 |
| **Kaffihúsið**<br>Bryggjubakki 14 | **10%** | Av øllum mati | 358787 |
| **Havgrím Seaside Hotel**<br>Yviri við Strond 14 | **10%** | Av øllum mati og gistingum | 201400 |
| **Muna v/Høgna Waag** | **10%** | Bókin "Mín lívsleið". Ókeypis útkoyring | 767601 |
| **Valdemar Lützen**<br>Byggibúð & Lásatænasta & Rustfrí<br>Heilsøla, Skálatrøð 14 | **15%** | Av øllum vørum | 301020 |
| **Marjun Wolles** | **15%** | Stjørnuløtur - Kærleikin gloymir ei<br>Fløga og tekstur | 271664 |
| **Hotel Djurhuus**<br>Yviri við Strond 19 | **10%** | Av mati og gisting | 355500 |
| **Fló Tøknihjálp** | **30%** | Av allari tøkniligari hjálp<br>(telefonir, teldir og teldlar, v.m.) | 227375 |
| **Thomas Dam á Hálsi**<br>Heykavegur 3 | **10%** | Av øllum vørum | 311400 |
| **Mensendieck Online** | **25%** | Av mánaðarhaldinum til Mens. Online | 515755 |
| **Petri Tannklinikk** | **10%** | Av protesum og útvaldum tannviðgerðum, ið ikki fáa almennan stuðul | 320320 |
| **Frihedsbrevet.fo** | **50%** | Av árshaldi | hey@frihedsbrevet.fo |

# Í Vágum

| | | | |
|---|---|---|---|
| Unicar | 10% | Av øllum leigubilum | 544000 |
| Frisørsalongin MidWay | 15% | | 213055 |
| Ursmiðjan | 10% | Av øllum brillum | 332024 |
| GRANT vindeygu og hurðar | 10% | Av øllum vørum | 355000 |
| Carrent.fo<br>Vága Floghavn | 10% | Av øllum leigubilum | 783000 |
| TATink v/Tummas Albert | 20% | Av arbeiðsløn upp á bilumvælingar | 551133 |
| Smiðjan | 10% | Av øllum mati | 588184 |
| Tannlæknastovan í Sandav. | 10% | Av protesum og útvaldum tannviðgerðum, sum ikki fáa almennan stuðul | 332726 |
| Fiskastykkið | 10% | Av øllum mati | 289834 |
| Handilsvirkið Niclasen | 10% | | 332001 |
| Hotel Vágar | 10% | Av gistingum (uttan morgunmat)<br>Kota: PENSJÓN10 ella ring 309090 | 289834 |
| Gásadalsgarður | 10% | Av øllum mati | 277013 |

# Í Sandoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| Búrhandilin í Skopun | 10% | Av tógvi og gávulutum | 361519 |

# Í Suðuroy

| | | | |
|---|---|---|---|
| Richard B. Thomsen & Søn Timburhandil A/S | 20% | Við kontantsølu | 661000 |
| Glasstovan á Tvøroyri<br>Tvørávegur 25 | 10% | Av øllum mati | 790064 |

## Í Norðoyggjum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Linsan Optik** Stoksoyrarvegur 15 Klaksvík | 15% | Av brillustellum og -gløsum | 313133 |
| **Sjómansheimið** Hotel Klaksvík | 10% | Av leigan av kømrum | 455333 |
| **JAP,** klædnabúð | 10% | | 456880 |
| **Vera Klipt** | 10% | Av allari hárviðgerð | 455677 |
| **Hvíthús** | 10% | Av klædnavørum | 455353 |
| **Seymistovan Hei-Mai** | 10% | Undantikið føroyski búnin | 457162 |
| **Leivur Ellingsgaard** | 10% | Ur, gull, silvur, brillur | 455203 |
| **Hjá Skós** | 10% | Av øllum skóm | 455057 |
| **Angus Steakhouse** | 10% | Av øllum mati mánadagar | 457777 |
| **El-in** | 5% | Av øllum vørum, undantikið tilboðsvørum | 284513 |
| **Norðoya Litbúð** | 15% | | 457300 |
| **Klaksvíkar Autolakering** | 10% | Av øllum vørum | 458787 / 288787 |
| **Bil & Dekkverkstaðið** Við John Heinesen | 10% | Av øllum billutum | 456959 / 217861 |
| **Kósabúðin** | 10% | Av øllum vørum | 455000 |

## Í Eysturoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Diana** | 10% | Av øllum hondarbeiði og ítrivsvørum uttan toy til føroyska búnan, seymimaskinum og lampum | 448125 |
| **Ur og brillur** | 10% | Av øllum brillum | 447950 |
| **Rokoko,** klædnahandil | 10% | Av øllum klæðum | 441039 |
| **Brá,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 422727 |
| **Shari,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 454646 |
| **Skósøla** við Terje Hansen | 10% | Av øllum vørum | 441018 |

# YVIRLIT YVIR PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØGINI Í FØROYUM 2025

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1, 160 Argir, tlf. 219394,**
**t-post: lp@eldri.fo,**
**heimasíða: www.eldri.fo**

**Limafeløgini:**

**1. Pensjónistafelagið Hugni**
Fundarstaður: í Smæruni, Kjalarvegur 48,
Maria Olsen, forkvinna, Geilin 34, 700 Klaksvík,
tlf. 282171, t-post: farotek@hotmail.com
Limatal: 156 Felagið stovnað: 19.10.1971

**2. Eldrafelagið Fjallið**
Hannilena Jacobsen, forkvinna, Við Ranggil 11,
520 Leirvík,
tlf. 756594, t-post: hannilena@gmail.com
Limatal: 40 Felagið stovnað: 18.03.1991

**3. Eldrafelagið Borgin**
Toftagøta 9, Fuglafjørður, Áshild Kristiansen,
forkvinna, Fjalsvegur 6, 530 Fuglafjørður,
tlf. 214621 og 580025,
t-post: ashild.kristiansen@skulin.fo
Limatal: 150 Felagið stovnað: 16.02.1985

**4. Oyndarfjarðar Pensjónistafelag**
Jørmund L. Juul, formaður, Tartavegur 5,
690 Oyndarfjørður,
tlf. 211918, T-postur: jljuul@olivant.fo
Limatal: 30 Felagið stovnað: 02.10.1991

**5. Eldrafelagið á Toftum**
á Kneysum 14, Toftir, Alfred Olsen, formaður,
Rókavegur 24, 656 Saltnes,
tlf. 447960 og 210960,
t-post: alfred-olsen@kallnet.fo
Limatal: 80 Felagið stovnað: 09.09.2015

**6. Eldrafelagið Nón**
Torvgøta 2, 600 Saltangará, Johild Joensen,
forkvinna, á Byrgisheyggi 5, 627 Lamba,
tlf. 448738 og 288738,
t-post: johildjoensen@outlook.com
Limatal: 154 Felagið stovnað: 16.09.1987

**7. Eldrafelagið Kumlá**
Elias Hansen, formaður, Skálavegur 92,
480 Skála,
tlf. 441188, t-post: eliassonja@gmail.com
Limatal: 45 Felagið stovnað: 15.02.1992

### 8. Pensjónistafelagið í Sjóvar Sókn

Petur Jákupsson, formaður, Skúlavegur 4,
490 Strendur,
tlf. 257987, t-post: pj0106d7@skulin.fo
t-post: sigrunandreasdanielsen@gmail.com
martin@olivant.fo
Limatal: 80 Felagið stovnað: 24.10.1988

### 9. Eldrafelagið á Eiði

Jóhanna á Fløtt forkvinna, á Brekkuvegi 26,
470 Eiði,
tlf. 224809, t-post: olavurflott@gmail.com.
Limatal: 68 Felagið stovnað: 26.03.2009

### 10. Sunda Pensjónistafelag

Vibeke Ingvarsson, forkvinna,
Norðskálavegur 36, 460 Norðskáli,
tlf. 267346 og 422226.
t-post: v_ingvarsson@hotmail.com
Limatal: 72 Felagið stovnað: 03.02.1985

### 11. Pensiónistafelagið í Havn

Fundarstaður Brigdehúsið,
Hoydalsvegur 21, 100 Tórshavn
Hilda Thomsen, forkvinna
tlf. 213722, teldupost: pfh@eldri.fo;
Limatal: 610 Felagið stovnað: 20.05.1976

### 12. Eldrafelagið Vesturskin

Páll Hellu, formaður, Niðari Vegur 69,
350 Vestmanna,
tlf. 252054, t- post: hellupall@gmail.com
Limatal: 87 Felagið stovnað: 28.05.1984

### 13. Vága Pensjónistafelag

í Ivanshúsi, c/o.Vesturvón, Kálvalíðvegur 2,
Miðvágur, Turid Olsen, forkvinna,
við Stóraklett 12, 360 Sandavágur,
tlf. 221432, t-post: turid56olsen@gmail.com
Limatal: 200 Felagið stovnað: 30.11.1981

### 14. Pensjónistafelagið "Kvøldarsól"

Anna Bjørg Leo, forkvinna, Garðavegur 7,
240 Skopun,
tlf. 229827, t-post: annabjorg2@msn.com
Limatal: 36 Felagið stovnað: 29.04.1982

### 15. Pensjónistafelagið HØFT

Jens Johannesen, formaður, Heiðatrøðin 5A,
800 Tvøroyri, tlf. 571770 og 371770,
t-post: jens571770@gmail.com
Limatal: 31 Felagið stovnað: 28.12.1981

### 16. Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy

Ingeborg Vinther, forkvinna, Geilin 38,
900 Vágur,
tlf. 573427, t-post: vinther@mail.fo
Limatal: 60 Felagið stovnað: 19.09.1985



# Eldri

## Landsfelag Pensjónista

Løkjatún 1 • FO-160 Argir
Tel: 21 93 94
T-postur: lp@eldri.fo
www.eldri.fo